Avgerð Kappingarráðsins tann 16. oktober 2026

Yvirtøkan hjá P/f Wenzel av ognunum hjá Sp/f Komfortbilum er góðkend við tilsøgn sum treyt

Kappingareftirlitið

Mál nr.: 25/00589

Dagfesting 20.10.2026

:

Innihald

1. Samandráttur 3
1.1. Avgerð 4
1.2. Tilsøgnin 5
2. Málslýsing 6
2.1. Inngangur 6
2.2. Partarnir 9
2.2.1. P/f Wenzel 9
2.2.2. Sp/f Komfortbilar 10
2.2.3. Sp/f NN Finans 10
2.3. Transaktiónin 11
2.4. Fráboðanarskylda 13
3. Marknaðarlýsing 15
4. Meting 18
4.1. Skilmarking av viðkomandi marknaði 18
4.1.1. Marknaðurin fyri sølu av nýggjum bilum 18
4.1.2. Marknaðurin fyri sølu av brúktum bilum 21
4.1.3. Marknaðurin fyri verkstaðstænastur 22
4.2. Ávirkan á kappingina 23
4.2.1. Marknaðarpartar og miðsavning 24
4.2.1.1. Viðkomandi marknaðurin fyri sølu av nýggjum persónbilum 27
4.2.1.2. Viðkomandi marknaðurin fyri sølu av premium merkja persónbilum 29
4.2.1.3. Viðkomandi marknaðurin fyri sølu av brúktum persónbilum 34
4.2.1.4. Viðkomandi marknaðurin fyri verkstaðstænastur 36
4.2.2. Møgulig einsæris árin (Non-coordinated effects) 37
4.2.2.1. Luttakandi fyritøkur hava stórar marknaðarpartar 37
4.2.2.2. Luttakandi fyritøkurnar eru tættir kappingarneytar 38
4.2.2.3. Kundarnir hava avmarkaðar møguleikar at skifta veitara 38
4.2.2.4. Kappingarneytar vilja sannlíkt ikki økja sítt útboð um prísirnir hækka 39
4.2.2.5. Samanlagda fyritøkan er før fyri at forða kappingarneytum at víðka 39
4.2.2.6. Yvirtøkan tekur burtur eitt týðandi kappingartrýst 39

4.2.3. Møgulig árin av samskipan 40
4.2.3.1. Møguleikin fyri semju um luttøkutreytir fyri samskipan 40
4.2.3.2. Møguleikin at hava eftirlit við samskipanini 40
4.2.3.3. Revsimøguleikar 41
4.2.3.4. Møguligar reaktiónir hjá øðrum fyritøkum 41
4.2.4. Yvirtøka av møguligum kappingarneyta 41
4.2.5. Hvørt samanleggingin skapar ella styrkir keyparamegi á einum ovara marknað 41
4.2.6. Keyparamakt á viðkomandi marknað 42
4.2.7. Atgongd til marknaðin 42
4.2.8. Virkni 42
4.2.9. Failing firm 42
4.2.10. Um samanleggingin ikki var framd 43
4.3. Møgulig boð eftir §21 í kappingarlógini 43
5. Niðurstøða 44

1. Samandráttur

1. Kappingareftirlitið móttók 2. apríl 2026 fráboðan eftir vanligum leisti um, at P/f Wenzel hevði keypt ávísar ognir og virkiseindir frá Sp/f Komfortbilar og Sp/f NN Finans. Fráboðanin varð mett fullfíggjað við gildi frá 16. apríl 2026. Transaktiónin fevnir um goymslu, leysafæ, útgerð, eykalutir og atgongd til leigumál hjá Sp/f Komfortbilar. Keypsprísurin er upplýstur til **[....]** kr.

2. Luttakandi fyritøkurnar eru P/f Wenzel sum yvirtakandi fyritøka og tær yvirtiknu virkiseindirnar hjá Sp/f Komfortbilar og Sp/f NN Finans. P/f Wenzel rekur bilasølu, verkstað og tænastuvirksemi í Føroyum og umboðar m.a. Ford, Volvo, Mazda, Kia, MG, Isuzu, BYD og Polestar. Sp/f Komfortbilar rak bilasølu og verkstað, men fór á konkurs 24. november 2025. Sp/f NN Finans hevði virksemi innan bilasølu, bilaútleigan og fígging av bilkeypi og varð 3. desember 2025 sent skiftirættinum til tvingsilsavtøku.

3. Kappingareftirlitið metir, at transaktiónin var ein samanlegging sambært § 13, stk. 1, nr. 2, í kappingarlógini, tí P/f Wenzel við keypinum fekk ræði á parti av einari aðrari fyritøku. Umsetningsmørkini í § 14 vóru uppfylt, og samanleggingin er fráboðanarskyldug sambært § 16, stk. 1 í kappingarlógini.

4. Umframt yvirtøkuna av verkstaðs- og bilasøluvirkseminum hjá Sp/f Komfortbilum eru eisini tvær aðrar avtalur gjørdar við tilknýti til yvirtøkuna. P/f Wenzel fær avtalu við BMW um at gerast BMW-serviceverkstað í Føroyum. Avtalan verður endaliga inngingin 26. september 2025 eftir at avtalan um yvirtøku av ognum hjá Sp/f Komfortbilum verður framd. Síðst í oktober verður avtala gjørd við tvey BMW umboð í Danmark um at selja BMW bilar í Føroyum. Ein av hesum umboðum er veitarin hjá Sp/f Komfortbilum.

5. Kappingareftirlitið metir viðkomandi marknaðir at verða innan sølu av nýggjum bilum, søla av brúktum bilum og verkstaðstænastur í Føroyum. Marknaðurin fyri sølu av nýggjum bilum fevnir um sølu av nýggjum premium merkja bilum og sølu av mass-market bilum. Kappingareftirlitið metir, at av tí at yvirtøkan serliga snýr seg um yvirøku av BMW-virkseminum hjá Sp/f Komfortbilum, so eigur viðkomandi marknaður at skilmarkast til sølu av premium merkja bilum í Føroyum.

6. Kappingareftirlitið metir, at samanleggingin munandi forðar fyri virknari kapping á føroyska bilmarknaðinum. Uttan nøktandi tilsøgn frá P/f Wenzel, sum gongur ivanum hjá Kappingareftirlitinum á møti, sendir Kappingareftirlitið tískil Kappingarráðnum tilmæli um at forbjóða yvirtøkuna, sambært § 15, stk. 2, í kappingarlógini. Somuleiðis verður mælt Kappingarráðnum til at brúka heimildina í § 21 í kappingarlógini, fyri at endurskapa marknaðarstøðuna, soleiðis sum hon var undan yvirtøkuni. Hetta kemur av, at yvirtøkan er gjøgnumført uttan góðkenning frá Kappingarmyndugleikanum, og er skaðilig fyri kappingina.

7. Tann 15. oktober 2026 letur P/f Wenzel Kappingareftirlitinum tilsøgn um, at P/f Wenzel gevst við sínum Volvo virksemi, um yvirtøkan av Sp/f Komfortbilum verður góðkend av Kappingarráðnum. Í fyrstu syftu uppsigur P/f Wenzel sítt søluumboð við Volvo, men heldur áfram at reka sítt Volvo verkstað fram til at nýtt umboð hevur fingið góðkenning sum Volvo verkstað.

8. Í sambandi við uppsøgnina av søluumboðinum bindur P/f Wenzel seg til ikki at selja nýggjar ella brúktar Volvo bilar í 3 ár.

9. Í sambandi við uppsøgn av verkstaðsumboðinum bindur P/f Wenzel seg at siga avtaluna upp skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 1 ár eftir, at tilsøgnin er gjørd bindandi, um ikki Kappingareftirlitið ikki hevur longt freistina.

10. Í sambandi við uppsøgnina av verkstaðsumboðinum bindur P/f Wenzel seg til at selja alla Volvo serútgerð, herundir lesarar o.a., til keyparan, um hesin ynskir tað, til ein av Kappingareftirlitinum góðkendan marknaðarprís.

11. Kappingareftirlitið metir, at veitta tilsøgnin gongur teimum ivamálum at møti, sum Kappingareftirlitið hevur í sambandi við yvirtøkuna hjá P/f Wenzel av virksemimum hjá Sp/f Komfortbilum, og tískil verður tilmælið til Kappingarráðið tillagað. Sostatt mælir Kappingareftirlitið Kappingarráðnum til at góðkenna yvirtøkuna hjá P/f Wenzel av ognunum hjá Sp/f Komfortbilum, treytað av tilsøgnini frá P/f Wenzel.

1.1. Avgerð

12. Kappingarráðið hevur á Kappingarráðsfundi, tann 16. oktober 2026, avgjørt, at góðkenna yvirtøkuna hjá P/f Wenzel av ognunum hjá Sp/f Komfortbilum, við tilsøgnini frá P/f Wenzel sum treyt fyri góðkenningini av yvirtøkuni, sbrt. § 19, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 2, 1. pkt.

1.2. Tilsøgnin

Tilsøgn frá P/f Wenzel í máli hjá kappingareftirlitinum um yvirtøkuna hjá P/f Wenzel av ognum hjá Sp/f Komfortbilar (j. nr. 25/00589)

Vísandi til, at Kappingareftirlitið eftir ætlan leggur tilmæli fyri Kappingarráðið um at forbjóða yvirtøkuna hjá P/f Wenzel av ognum hjá Sp/f Komfortbilum í máli j. Nr. 25/00589, skal P/f Wenzel geva tilsogn í málinum, fyri at ganga ivanum hjá Kappingareftirlitinum á møti, til tess at Kappingareftirlitið kann mæla Kappingarráðnum at góðkenna yvirtøkuna við hesi tilsogn sum treyt, sbrt. § 19, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 2, 1. pkt.:

Viðvíkjandi innflutningi- og sølu av Volvo bilum

P/f Wenzel samtakið skal uppsiga sína søluumboðsavtalu við Volvo, og bindur seg til ikki at innflyta og selja ávikavist nýggjar og brúktar Volvo bilar í trý ár frá at Kappingarráðið hevur góðkent yvirtøkuna sbrt. § 19, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 2, 1. pkt. Forboðið fevnir eisini um keyp av brúktum Volvo bilum í Føroyum, við viðari sølu fyri eyga, og sølu av brúktum Volvo bilum vegna kunda.

Hóast innflutnings- og søluforboðið av ávikavíst nýggjum og brúktum Volvo bilum, kann P/f Wenzel samtakið framvegis selja brúktar Volvo bilar, sum P/f Wenzel samtakið tekur, ella hevur tikið, í býti í sambandi við sølu av nýggjum bilum.

Volvo bilar, sum P/f Wenzel samtakið hevur bílagt áðrenn góðkenningina frá Kappingarráðnum sbrt. § 19, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 2, 1. pkt., eru undantiknir omanfyri nevnda forboði. Talan er um í mesta lagi 30 bilar.

Viðvíkjandi góðkenningini hjá P/f Wenzel sum Volvo verkstaður

P/f Wenzel samtakið skal reka Volvo verkstað inntil onnur fyritøka hevur fingið góðkenning sum Volvo verkstaður. P/f Wenzel skal uppsiga sína verkstaðsavtalu við Volvo skjótast gjørligt, og í seinasta lagi 1 ár eftir, at Kappingarráðið hevur góðkent yvirtøkuna sbrt. § 19, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 2, 1. pkt. Kappingareftirlitið kann, undir serligum umstøðum, og eftir umbøn, leingja freistina.

P/f Wenzel samtakið bindur seg harumframt til at selja alla Volvo serútgerð, herundir lesarar o.a., til ta fyritøku, sum fær góðkenning sum Volvo verkstaður, til ein av Kappingareftirlitinum mettan marknaðarpris.

2. Málslýsing

2.1. Inngangur

13. Málið hevur havt eina drúgva og óvanliga gongd. Málið byrjaði við, at stjórin í P/f Wenzel vendi sær til Kappingareftirlitið, tann 25. september 2025, um keyp av eykalutagoymslu og 11 brúktum bilum frá Sp/f Komfortbilum fyri at spyrja, um yvirtøkan av ognunum skuldi fráboðast. Sama dag bað Kappingareftirlitið um at fáa útflýggjað eitt eintak av søluavtaluni fyri at meta um, hvørt yvirtøkan skuldi fráboðast.

14. Tann 29. september 2025 fær Kappingareftirlitið eintak av søluavtaluni frá stjóranum í P/f Wenzel umvegis teldupost. Avtalan er millum Sp/f NN Finans og Sp/f Komfortbilar øðrumegin, og P/f Wenzel hinumegin. Avtalan fevnir ikki bara um eina eykalutagoymslu og 11 brúktar bilar, men eisini um:

- allar bilar, leigubilar, brúktar bilar og óskrásettar bilar hjá Sp/f Komfortbilum og NN Sp/f Finans,
- allar eykalutir, sum Sp/f Komfortbilar og NN Finans eiga,
- allar debitorar hjá Sp/f Komfortbilum og Sp/f NN Finans,
- alt inventar og skeltir hjá Komfortbilum og NN Finans og
- rættin at traðka inn í leigumálið við seljaranum við Sp/f NN Holding um matr. nr. 1095b, Tórshavn.

15. Leigumálið fevndi um hølir, har Sp/f Komfortbilar hevði verkstað, goymslu, sýnisglugga og skrivstovu, umframt sjálvt grundøkið á 2.693 m3. Yvirtøkudagurin var avtalaður til 23. september 2025 og søluavtalan var dagfest tann 22. september 2025.

16. Tann 9. oktober 2025 sendi Kappingareftirlitið eina avgerð til stjóran á P/f Wenzel, har boðað var frá, at talan var um eina yvirtøku, sum skuldi fráboðast sambært § 16, stk. 1, í kappingarlógini.

17. Avgerðin hjá Kappingareftirlitinum er grundað á, at yvirtøkan fevnir um nærum allar ognir hjá Sp/f Komfortbilar og Sp/f NN Finans innan bilasølu og verkstað, og gjørdi tað møguligt at føra alt virksemi hjá Komfortbilum víðari, undantikið søluna av Maxus bilum.

18. Í avgerðini verður kunnað um, at ein yvirtøka ikki kann fremjast uttan góðkenning frá Kappingareftirlitinum, sbrt. §15, stk. 5 í kappingarlógini, ella uttan undantaksloyvi frá Kappingareftirlitinum, sbrt. § 15, stk. 6 í kappingarlógini.

19. Við avgerðini fekk P/f Wenzel kæruvegleiðing um, at kærast kundi til Føroya Kærustovn innan 4 vikur frá, at avgerðin var móttikin. P/f Wenzel kærdi ikki avgerðina.

20. Tann 9. desember 2025 móttók Kappingareftirlitið fráboðan eftir §16, stk. 1 í kappingarlógini frá P/f Wenzel um yvirtøkuna av ognunum hjá Sp/f Komfortbilum. Advokaturin hjá P/f Wenzel hevur fráboðað eftir einfaldum leisti.

21. Í sambandi við fráboðanina boðar advokaturin hjá P/f Wenzel frá, at hvørki hann ella P/f Wenzel meta, at talan er um nakað slag av samanlegging, men einans keyp av einstøkum ognum, sum ikki viðføra samanlegging í kappingarlógarinnar týdning.

22. Tað hevur í hesum sambandi týdning at vísa á, at P/f Wenzel var kunnað um kærumøguleikan og valdi ikki at leggja málið fyri Føroya Kærustovn.

23. Tann 11. desember 2025 váttaði Kappingareftirlitið fyri móttøku av fráboðaðu samanleggingini. Samstundis boðaði Kappingareftirlitið frá, at fráboðanin var ófullfíggjað, tí skjøl manglaðu. Kappingareftirlitið kravdi harumframt kvittan fyri rindaðum ómaksgjaldi sambært § 17 í kappingarlógini og upplýsti, at fráboðanin fyrst kundi metast fullfíggjað, tá kravdu skjølini og kvittanin fyri ómaksgjald vóru móttikin.

24. Tann 19. desember 2025 var telefoniskt samskifti millum Kappingareftirlitið og Føroya Banka um søluna av Sp/f Komfortbilar. Eftir hetta sendi Kappingareftirlitið, tann 5. januar 2026, skrivliga umbøn til bankan um, at fáa útflýggjað alt tilfar í sambandi við søluna av Sp/f Komfortbilar. Kappingareftirlitið upplýsti, at tilfarið skuldi nýtast til at meta um yvirtøkuna hjá P/f Wenzel í mun til reglurnar um samanleggingareftirlit í kappingarlógini, og vísti til heimildina í § 28, stk. 1, í kappingarlógini.

25. Tann 5. januar 2026 sendi umboðið hjá P/f Wenzel tey skjøl, sum Kappingareftirlitið hevði biðið um í sambandi við ófullfíggjaðu fráboðanina. Hetta fevndi um roknskapir fyri P/f Wenzel, Sp/f Komfortbilar og Sp/f NN Finans fyri 2022-2024, skrásetingarsamandráttir, upplýsingar um bruttovinning, søluváttmála og kvittan fyri flyting av ómaksgjaldi á 50.000 kr. Umboðið upplýsti samstundis, at eingin onnur greining, frágreiðing, fundarupprit ella líknandi skjøl viðvíkjandi samanleggingini vóru til, uttan sáttmálin.

26. Tann 6. januar 2026 spurdi Føroya Banki, um Kappingareftirlitið kundi nágreina, hvat tilfar eftirlitið hevði tørv á, tí felagið hevði verið kundi í bankanum í nógv ár og bankin hevði nógv tilfar liggjandi. 7. januar 2026 nágreinaði Kappingareftirlitið umbønina og upplýsti, at eftirlitið ynskti tilfar, sum var nýtt í sjálvari søluni, herundir skjøl, tilmælir til leiðslu, metingar, samskifti við persónar, sum høvdu við søluna at gera, og søluváttmálan. Kappingareftirlitið vísti eisini á upplýsingar um, at sølan var framd, tí bankin vildi tryggja sítt veð, og bað um frágreiðing um, hví felagið varð koyrt undir trotabúsviðgerð, umframt lista yvir, hvat P/f Wenzel keypti, og hvat var eftir í Sp/f Komfortbilum.

27. Tann 9. januar svaraði Føroya Banki fyrispurninginum frá Kappingareftirlitinum, og sendi avrit av søluváttmála millum P/f Wenzel øðrumegin og Sp/f Komfortbilar og Sp/f NN Finans hinumegin, dagfestur 22. september 2025. Hesin skuldi verið identiskur við tann søluváttmála, sum var sendur til Kappingareftirlitið tann 29. september 2025. Tó vóru ávísir munir millum sáttmálarnar. Eitt nú var ósamsvar millum sáttmálarnar í § 4, tí at í sáttmálanum, sum Føroya Banki hevði móttikið, var lagt soleiðis afturat:

> "Partarnir eru samdir um, at sáttmálin í allar mátar er treytaður av, at keyparin verður góðkendur av BMW Group Danmark A/s sum serviceverkstaður fyri BMW í Føroyum í seinasta lagi tveir mánaðir eftir yvirtøkudagin.
>
> Sáttmálin er eisini treytaður av møguligari góðkenning av Kappingareftirlitinum."

28. Tann 8. januar 2026 sendi Kappingareftirlitið móttøkuváttan til umboðið hjá P/f Wenzel og váttaði móttøku av fráboðanini saman við kvittan fyri ómaksgjaldi. Kappingareftirlitið upplýsti, at fráboðanin var móttikin 5. januar 2026, og at eftirlitið sambært reglugerðini hevði 8 yrkadagar at upplýsa, hvørt fráboðanin var fullfíggjað.

29. Tann 12. januar 2026 sendi Kappingareftirlitið teldupost til umboðið fyri P/f Wenzel um, at grundað á teir marknaðarpartar, sum P/f Wenzel hevði upplýst, so kundi ikki fráboðast eftir einfaldum leisti, men av tí at upplýstu marknaðarpartarnir lógu somikið tætt at markvirðinum, vildi Kappingareftirlitið geva P/f Wenzel møguleika at kanna eftir, um umsetningstølini vóru gjørd upp soleiðis sum ásett er í kunngerð nr. 5 frá 23. januar 2025 um útrokning av umsetningi. P/f Wenzel fekk freist til 19. januar 2026 at eftirkanna tølini.

30. Tann 5. februar sendi Kappingareftirlitið eina avgerð um, at yvirtøkan skuldi fráboðast eftir vanligum leisti. Avgerðin varð grundað á, at samlaði marknaðarparturin hjá luttakandi fyritøkunum var omanfyri 15%, har treytin fyri at fráboða eftir einfaldum leisti fyri fyritøkur á sama marknaði er, at tær tilsamans í mesta lagi hava 15% av viðkomandi marknaði, sbrt. § 3, stk. 1, nr. 4 í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025 um samanleggingar. Kappingareftirlitið metti harumframt, at tann sølutilgongdin, sum var upplýst fyri Kappingareftirlitinum, ikki var í samsvari við ta faktisku sølugongdina, og fór Kappingareftirlitið tí undir øllum umstøðum at krevja vanliga fráboðan, sbrt. § 3, stk. 2 í reglugerð nr. 2 frá 3 januar 2025 um samanleggingar. P/f Wenzel fekk tískil 15 yrkadagar til at koma við eini fráboðan eftir vanligum leisti. Í avgerðini var P/f Wenzel kunnað um møguleikan at kæra avgerðina til Føroya Kærustovn.[1]

31. Tann 12. mars 2026 sendi Kappingareftirlitið teldupost til P/f Wenzel um, at málið verður meldað til ákæruvaldið, tí eingin fráboðan var komin eftir ásettu freist, sbr. §16, stk. 1 og yvirtøkan var framd uttan góðkenning. Víst var á, at yvirtøkan framvegis skuldi fráboðast, soleiðis at Kappingareftirlitið kundi taka støðu til, hvørt yvirtøkan skuldi góðkennast ella noktast, sbrt. §15, stk. 1 í kappingarlógini. Kunnað var enn einaferð um at yvirtøkan ikki kundi fremjast uttan góðkenning frá Kappingareftirlitinum, sbr. §15, stk. 5 í kappingarlógini. Kappingareftirlitið álegði P/f Wenzel at fráboða yvirtøkuna eftir vanligum leisti í seinasta lagi tann 19. mars 2026, og um eingin fráboðan komin inn rættstundis, fór Kappingareftirlitið at áleggja vikuliga sekt inntil fráboðan var komin til Kappingareftirlitið.[2]

32. Sama dag sendi umboðið fyri P/f Wenzel teldupost til Kappingareftirlitið, har greitt verður frá, at ein misskiljing er farin fram millum partarnar, sum hevur havt við sær, at eingin fráboðan er komin. Umboðið vísir á, at tað fara at verða nakrar avbjóðing viðvíkjandi at fáa tilfar og biðir um at freistin at fráboða verður flutt frá 19. mars 2026 til 2. apríl 2026.[3]

33. Tann 17. mars 2026 sendi Kappingareftirlitið teldupost til umboðið fyri P/f Wenzel har boðað verður frá, at umbønin um longda freist var gingin á møti, og nýggj freist tí var sett til 2. apríl 2026.[4]

34. Tann 2. apríl fekk Kappingareftirlitið fráboðan eftir vanligum leisti frá P/f Wenzel um yvirtøkuna av ognum hjá Sp/f Komfortbilum.[5] Kappingareftirlitið sendi, tann 8. apríl 2026, teldupost til P/f Wenzel um, at fráboðanin var ófullfíggjað. Víst var til avgerðarskriv, dagfest tann 5. mars 2026, har avgjørt var, at eisini virkisøkið bilasøla skuldi fráboðast. Boðað var frá, at um virkisøkið bilasøla ikki var fráboðað innan 15. apríl 2026, so fór vikulig sekt at verða áløgd, sbr. §34, stk. 1 í

[1] 25/00589-19
[2] 25/00589-40
[3] 25/00589-42
[4] 25/00589-44
[5] 25/00589-53

kappingarlógini, til yvirtøkan av virkisøkinum bilasøla varð fráboðað.[6] Tann 16. apríl 2026 fekk Kappingareftirlitið ískoytisskjal til upprunaligu fráboðanina, soleiðis at virkisøkið bilasøla nú eisini var fráboðað.[7]

35. Sama dag sendi Kappingareftirlitið boð til P/f Wenzel um, at fráboðanin var fullfíggjað, sbr. §4 í reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025, við gildi frá 16. apríl 2026.

Tann 28. mai 2026 sendi Kappingareftirlitið boð um, at Kappingareftirlitið hevði tikið avgerð um at kanna yvirtøkuna nærri, sbr. §18, stk. 1 í kappingarlógini.

36. Undir málsviðgerðini er Kappingareftirlitið vorið varugt við, at P/f Wenzel hevur yvirtikið bilsmiðir, herundir ein BMW-bilsmið, goymslufólk, móttøkufólk og marknaðarføringsfólk. Harumframt hevur P/f Wenzel gjørt avtalu við fyrrverandi stjóran í Sp/f Komfortbilum, umvegis egið felag, um at veita grafiskar loysnir til P/f Wenzel. Avtalan og starvsetanirnar eru gjørdar um somu tíð sum yvirtøkan. Hetta er alt viðurskifti, ið áttu at verið við í fráboðanini til Kappingareftirlitið. Eitt nú er tað viðkomandi fyri Kappingareftirlitið at eftirkanna, um kappingarklausular eru ásettir, sum fara út um tað sum er loyvt eftir kappingarlógini.

37. Harumframt er komið fram, at P/f Wenzel fór undir at fáa góðkenning sum BMW service veitari, tá tað hoyrdist at Sp/f Komfortbilar vóru í trupulleikum. P/f Wenzel fór eisini í gongd við at finna veitarar av nýggjum og brúktum BMW-bilum, og gjørdi tvær avtalur við danskar veitarar, herundir tann veitaran, sum umboð fyri P/f Wenzel segði, at Sp/f Komfortbilar hevði havt. Hesar avtalur áttu at verið við í fráboðanini, tí tær eru knýttar at yvirtøkuni av ognunum hjá Sp/f Komfortbilum.

2.2. Partarnir

38. Luttakandi fyritøkurnar eru P/f Wenzel sum yvirtakandi fyritøka og tær virkiseindir og ognir hjá Sp/f Komfortbilar og Sp/f NN Finans, sum P/f Wenzel hevur keypt. Í fráboðanini er upplýst, at Sp/f Komfortbilar og Sp/f NN Finans høvdu virksemi innan bilasølu, verkstað, útleigan og fígging av bilkeypi.

2.2.1. P/f Wenzel

39. P/f Wenzel er skrásett við skrásetingarnr. 2065 og hevur bústað á Akranesgøtu 5 í Tórshavn. Høvuðsvirksemi felagsins er søla av bilum og eykalutum, umvælingar og aðrar tænastur innan bilvinnuna í Føroyum. Sambært ársfrásøgnini fyri 2024 umboðar P/f Wenzel merkini Ford, Volvo, Mazda, Kia, MG, Isuzu, BYD og Polestar í Føroyum. Felagið hevði í 2024 eitt bruttoúrslit á 34,8 mió. kr. ársúrslit á 5,7 mió. kr. og eginogn á 28,0 mió. kr.

40. Partapeningurin í P/f Wenzel er býttur við 81,6% til Sp/f 5.03.12, ið Rúni Martinsson Djurhuus eigur, og 14,6% til Sp/f Plys.

41. Partapeningurin í Sp/f Plys er býttur við 50% til Sp/f 20.07.89, og 50% til Sp/f Feitihella.

42. Eigarir á Sp/f 20.07.89 eru Ingi Solberg Joensen 50%, og Sólbjørg Yvonna Joensen 50%. Eigarir á Sp/f Feitihella eru Hjalti Hvítklett 43,75%, Lena Jóhanna Nybo Hvítklett 43,75%, Dávid Hvítklett 6,25% og Kristina Hvítklett 6,25%.

---

[6] 25/00589-51
[7] 25/00589-51

43. Í talvuni niðanfyri er yvirskipað lýsing av fíggjarligu gongdini hjá P/f Wenzel árini 2020-2024.

P/F Wenzel	2024	2023	2022	2021	2020
Bruttovinningur	34.789	27.257	24.676	36.332	27.161
EBITDA	14.102	5.270	9.683	21.382	14.559
Ársúrslit	5.743	-677	5.565	15.185	9.594
Ogn Tilsamans	113.170	94.217	70.971	100.515	84.913
Eginpeningur	28.026	22.283	27.187	42.969	32.785

2.2.2. Sp/f Komfortbilar

44. Sp/f Komfortbilar er skrásett við skrásetingarnr. 3742. Felagið rak bilasølu, verkstað og annað virksemi í hesum sambandi. Sambært skrásetingarsamandrátti fór felagið í konkurs 24. november 2025, og Ken Nónklett, adv., varð skrásettur sum kurator. Roknskapurin fyri 2024 vísti eitt hall á 6,8 mió. kr. og negativa eginogn á 3,7 mió. kr. Grannskoðarin gav avsannandi niðurstøðu vegna óvissu um framhaldandi rakstur og viðurskifti viðvíkjandi innrokning av áogn.

45. Partapeningurin í Sp/f Komfortbilar er býttur við 50,72% til Sp/f Heildin, ið Palli Skorheim eigur, 19,67% til Sp/f Flykra, ið Jóna Skorheim eigur, 19,67% til P/f Norðoya Íløgufelag, og 9,94% til Valbjørn Ragnar Johannes Mittelstein.

46. Í talvuni niðanfyri er yvirskipað lýsing av fíggjarligu gongdini hjá Sp/f Komfortbilar árini 2020-2024.

Sp/F Komfortbilar	2024	2023	2022	2021	2020
Bruttovinningur	365	6.354	4.760	2.781	3.351
EBITDA	-4.440	1.406	491	273	1.001
Ársúrslit	-6.793	581	-295	-95	593
Ogn Tilsamans	7.920	16.048	11.251	12.041	15.830
Eginpeningur	-3.685	3.980	3.398	795	4.741

2.2.3. Sp/f NN Finans

47. Sp/f NN Finans er skrásett við skrásetingarnr. 6282 og hevði sambært skrásetingarsamandrátti til endamáls at leiga út bilar, leasa út bilar, fíggja bilkeyp, harundir bilasølu og annað virksemi í hesum sambandi. Felagið varð 3. desember 2025 sent skiftirættinum til tvingsilsavtøku. Roknskapurin fyri 2024 vísti hall á 0,4 mió. kr. og negativa eginogn á 1,0 mió. kr. og grannskoðarin gav avsannandi niðurstøðu vegna óvissu um framhaldandi rakstur.

48. Partapeningurin í Sp/f NN Finans er býttur við 50,72% til Sp/f Heildin, ið Palli Skorheim eigur, 19,67% til Sp/f Flykra, ið Jóna Skorheim eigur, 19,67% til P/f Norðoya Íløgufelag, og 9,94% til Valbjørn Ragnar Johannes Mittelstein.

49. Í talvuni niðanfyri er yvirskipað lýsing av fíggjarligu gongdini hjá Sp/f NN Finans árini 2020-2024.

Sp/F NN Finans	2024	2023	2022	2021	2020
Bruttovinningur	-541	162	-425	1.292	996
EBITDA	-541	162	-425	1.292	996
Ársúrslit	-382	-876	-516	654	-417
Ogn Tilsamans	3.706	6.086	6.545	9.172	12.119
Eginpeningur	-972	-590	286	803	149

2.3. Transaktiónin

50. Transaktiónin er lýst sum eitt keyp av ávísum ognum hjá Sp/f Komfortbilar og Sp/f NN Finans. Keypið fevnir sambært fráboðanini um goymslu, leysafæ og annað, sum er fevnt av virkisveðnum hjá fíggjandi bankanum, umframt atgongd til leigumáli hjá Sp/f Komfortbilar til 1. februar 2026. Keypsprísurin er upplýstur til **[....]** kr.

51. Kappingareftirlitið metir, at transaktiónin er fevnd av § 13, stk. 1, nr. 2, í kappingarlógini. Við keypinum yvirtekur P/f Wenzel nærum øll virkisøkini hjá Sp/f Komfortbilum, undantikið søluna av Maxus bilum. Virkisøkini fevndu um bilasølu av nýggjum og brúktum bilum, herundir BMW, verkstaðstænastur, herundir BMW service, og sølu av eykalutum, herundir BMW eykalutir.

52. Undir málsviðgerðini er komið fram, at fleiri aðrar avtalur eru gjørdar, sum vóru viðkomandi fyri yvirtøkuna, herundir at P/f Wenzel hevur gjørt avtalu við lyklastarvsfólk hjá P/f Komfortbilum. Somuleiðis hevur P/f Wenzel gjørt avtalu við BMW Danmark um at gerast BMW-serviceverkstað, og hevur gjørt avtalu við donsk BMW-søluumboð um veiting av nýggjum og brúktum BMW-bilum.

53. Galdandi fyri allar omanfyri nevndu avtalur er, at tær eru inngingnar um somu tíð sum yvirtøkan av Sp/f Komfortbilum fór fram. Útkast til avtaluna við stjóran á Sp/f Komfortbilum er frá 22. september 2025[8] og avritið av avtaluni sær út til at verða undirskrivað tann 25. september 2025[9], ið er tríggjar dagar eftir at sølusáttmálin um sølu av virkseminum hjá Sp/f Komfortbilum var undirskrivaður.[10] Tað eru tvær útgávur av sølusáttmálanum[11,12], har í øðrum er ásett, at yvirtøkan í síni heild er treytað av, at P/f Wenzel verður góðkent sum BMW-serviceverkstað. Sølusáttmálarnir eru báðir dagfestir 22. september 2025.

54. Uttan mun til hvør sølusáttmáli er komin fyri hvønn, so er greitt at yvirtøkan av virkseminum hjá Sp/f Komfortbilum og BMW-servicesáttmálin eru atknýtt.

55. Loyvið frá BMW um at gerast BMW service verkstað er dagfest 26. september 2025, og vísir til eina aðra avtalu, BMW and MINI Service Agreement, frá 1. oktober 2023, ið er standardavtalan hjá BMW group við síni BMW service verkstøð, herundir Sp/f Komfortbilar. Tað vil siga, at P/f Wenzel í grundini eisini yvirtekur hetta virksemið, sum Sp/f Komfortbilar áður hevði. Hendan avtalan bleiv gjørd dagin eftir yvirtøkuna av virkseminum hjá Sp/f Komfortbilum.

56. Sakførarin hjá P/f Wenzel hevur, í samskifti við Kappingareftirlitið, greitt frá, at orsøkin til, at P/f Wenzel ikki hevur selt nýggjar BMW-bilar áðrenn 2025 var, at fyritøkan ikki ynskti at innflyta bilar, sum felagið ikki var verkstaðumboð fyri, tí hetta skapar stóra ónøgd millum kundar.[13] Hetta kann Kappingareftirlitið eisini staðfesta, eftir at hava móttikið seruppgerð frá Akstovuni tann 6. oktober 2026. Har framgongur, at P/f Wenzel hvørki hevur innflutt ávikavist nýggjar ella brúktar BMW bilar í tíðarskeiðinum 2019 til 2024.

---

[8] 25/00589-63: Útgreinandi fyrispurningar og svar uppá hesar
[9] 25/00589-64: Avtalan við Palla Skorheim
[10] 25/00589-8: Umbøn um upplýsingar og svar uppá umbøn, herundir sølusáttmáli
[11] 25/00589-8: Umbøn um upplýsingar og svar uppá umbøn, herundir sølusáttmáli
[12] 25/00460-2- Sáttmalið - Komfortbilar
[13] 25/00589-74: Svar uppá fyrispurning sum upprunaliga var sendur 2. juni 2026 og sum rykt varð eftir tann 11. august 2026

57. Í parti 1.5.2. í ES-vegleiðingini, C 95/01/2008[14], verður umrøtt, nær fleiri løgfrøðiliga atskildar transaktiónir skulu metast sum ein samlað samanlegging, og nær tær hinvegin skulu metast sum verandi hvør sær. Vegleiðingin tekur tað útgangsstøði, at tað er veruliga og búskaparliga innihaldið í transaktiónunum, sum er avgerandi, og ikki hvørt keyparin formliga hevur valt at skipa eina transaktión sum eina ella fleiri avtalur.

58. Tað er eitt grundleggjandi krav fyri at fleiri transaktiónir skulu metast sum ein samlað samanlegging, at tað er ein og sama fyritøka sum fær ræði.[15]

59. Um fleiri transaktiónir eru bundnar saman soleiðis, at ein transaktión ikki verður framd uttan hina, ella um tær eru gjørdar millum somu partar, um somu tíð og við sama búskaparliga endamáli, kunnu tær vera so sínámillum treytaðar, at tær skulu viðgerast sum ein og sama konsentratión.[16]

60. Hetta er serliga viðkomandi, um allar transaktiónirnar saman føra til eina varandi broyting í ræðinum yvir einari fyritøku ella einum sjálvstøðugum virkisøki, meðan hvør einstøk avtala fyri seg ikki gevur fulla mynd av tí búskaparliga veruleikanum.

61. Hinvegin verða transaktiónir vanliga ikki mettar sum ein koncentratión, um tær ikki eru sínámillum treytaðar, hava sjálvstøðugt búskaparligt endamál, kunnu fremjast óheftar av hvørji aðrari, ella ikki samlað føra til eina og somu varandi broyting í ræðinum.[17]

62. Sum áður er víst á, so eru fleiri avtalur gjørdar í sama tíðarskeiði sum sølan av ognunum hjá Sp/f Komfortbilum.

63. P/f Wenzel hevur sett fleiri starvsfólk hjá P/f Komfortbilum, herundir ein BMW bilsmið. Talan er um starvsfólk sum arbeiddu hjá Sp/f Komfortbilum í 2025, og sum í 2026 arbeiða fyri P/f Wenzel.

64. [.....]

65. [.....]

66. Umboð fyri P/f Wenzel hava áhaldandi hildið fast um, at BMW-serviceavtalan, sum felagið hevði gjørt, var óviðkomandi fyri yvirtøkuna av ognunum hjá Sp/f Komfortbilum, og hevði verið komin undir land uttan mun til, um P/f Wenzel hevði yvirtikið ognirnar hjá Sp/f Komfortbilum, ella ikki.

67. Kappingareftirlitið metir, at BMW-serviceavtalan hevur ein so tættan búskaparligan og tíðarbundnan samanhang við yvirtøkuna, at hon eigur at innganga í samlaðu metingini av transaktiónini. Í fyrsta lagi kom góðkenning í lag tann 26. september, sum er dagin eftir at yvirtøkan var framd. Í góðkenningini verður beinleiðis víst til standardavtaluna hjá BMW Group, sum er galdandi fyri øll góðkend BMW verkstøð, herundir Sp/f Komfortbilar. Tað framgongur eisini av øðrum samskifti, at P/f Wenzel í longri tíð hevði roynt at gerast serviceverkstað fyri BMW[18], men

---

[14] Commission Consolidated Jurisdictional Notice under Council Regulation (EC) No 139/ 2004 on the control of concentrations between undertakings (2008/C95/01)
[15] Commission Consolidated Jurisdictional Notice under Council Regulation (EC) No 139/ 2004 on the control of concentrations between undertakings (2008/C95/01), reglubrot 41
[16] Commission Consolidated Jurisdictional Notice under Council Regulation (EC) No 139/ 2004 on the control of concentrations between undertakings (2008/C95/01), reglubrot 41
[17] Commission Consolidated Jurisdictional Notice under Council Regulation (EC) No 139/ 2004 on the control of concentrations between undertakings (2008/C95/01), reglubrot 41
[18] 25/00589 Fráboðan frá P/f Wenzel um yvirtøku av ognum hjá Sp/f Komfortbilar, málsviðgerðarnota í 360 dagfest 20 juli 2026, kl. 11:15.

at glið ikki var komið á samráðingarnar hjá P/f Wenzel við BMW fyrr enn at tað gjørdist greitt fyri BMW Danmark, at Sp/f Komfortbilar fór at lata hurðarnar aftur.[19]

68. Umboð fyri P/f Wenzel hava somuleiðis greitt frá, at avtala var gjørd við tey bæði donsku umboðini um at innflyta ávikavist nýggjar og brúktar BMW-bilar at selja í Føroyum. Eitt av hesum umboðum var fyrrverandi veitarin hjá Sp/f Komfortbilum. Her hevur stjórin hjá P/f Wenzel, á fundi hjá Kappingareftirlitinum fleiri ferðir ført fram, at hann ongan áhuga hevur í at innflyta BMW-bilar uttan at kunna veita service. Hann heldur at tað beinleiðis er skeivt at innflyta bilar uttan at veita service upp á teir.[20] Sama grundgeving er at finna í skrivligum samskifti frá sakføraranum hjá P/f Wenzel við Kappingareftirlitið.[21]

69. Upplýsingarnar í málinum benda sostatt greitt á, at omanfyrinevndu avtalur hanga saman og eru sínámillum treytaðar. Tann búskaparligi veruleikin er, at P/f Wenzel hevur yvirtikið alt virksemi hjá P/f Komfortbilum, herundir alt BMW-virksemi, undantikið sølu og viðlíkahaldi av Maxus bilum.

2.4. Fráboðanarskylda

70. Fráboðanarskyldan í § 16, stk. 1, í kappingarlógini fevnir um transaktiónir, sum eru fevndar av § 13, stk. 1 ella 2, og har umsetningsmørkini í § 14, stk. 1, nr. 1 eru rokkin. Í hesum máli er talan um yvirtøku av virkisøkjum, og tí skal umsetningurin hjá yvirtiknu virkisøkjunum metast saman við umsetninginum hjá yvirtakandi fyritøkuni.

71. Fráboðanarskyldan í § 16, stk. 1 í kappingarlógini fevnir um tær transaktiónir sum eru fevndar av § 13, stk. 1 og 2 í kappingarlógini, og har umsetningsmørkini í § 14, stk. 1, nr. 1 ella nr. 2 eru rokkin.

72. Sambært § 13, stk. 1 í kappingarlógini er talan um eina samanlegging eftir kappingarlógini, tá tvær ella fleiri fyritøkur, sum hava virkað sjálvstøðugt, verða lagdar saman, ella tá ein ella fleiri persónar, sum longu hava ræðið á minst einari fyritøku, ella tá ein ella fleiri fyritøkur við keyp av pørtum ella ognum, gjøgnum avtalu ella á annan hátt, fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræðið á allari ella pørtum av einari ella fleiri fyritøkum afturat.

73. Sambært fráboðanini er talan um eina transaktión, har P/f Wenzel við keypi av ognum og fær ræði á pørtum av virkseminum hjá Sp/f Komfortbilar og Sp/f NN Finans. Transaktiónin kemur tí undir § 13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini.

74. Kappingareftirlitið fekk, tann 29. september 2025, eintak av søluáttmálanum millum P/f Wenzel og seljararnar, og við støði í áttmálanum var staðfest, at alt virksemið hjá P/f Komfortbilum kundi halda áfram hjá P/f Wenzel við teimum ognum sum vóru yvirtiknar, undantikið sølan av Maxus bilum.

75. Tann 9. oktober 2025 sendi Kappingareftirlitið eina avgerð til stjóran á P/f Wenzel har boðað verður frá, at talan er um eina yvirtøku sum skal fráboðast, sbr. §16, stk. 1 í kappingarlógini.

---

[19] 25/00589-68: Svar frá advoakti um BMW service avtalu
[20] 25/00589 Fráboðan frá P/f Wenzel um yvirtøku av ognum hjá Sp/f Komfortbilar, málsviðgerðarnota í 360 dagfest 20 juli 2026, kl. 11:15.
[21] 25/00589-74: Svar uppá fyrispurning sum upprunaliga var sendur 2. juni 2026 og sum rykt varð eftir tann 11. august 2026

76. Eftirfylgjandi er staðfest, at P/f Wenzel hevði søkt um at gerast BMW service verkstað og í sama tíðarskeiði hevði gjørt avtalu við sama veitara av BMW, sum Sp/f Komfortbilar hevði, og at P/f Wenzel hevði gjørt avtalu við leiðsluna og við lyklastarvsfólk, eitt nú BMW tøkning í Sp/f Komfortbilum.

77. Tískill er greitt, at veruligu viðurskiftini eru tey, at P/f Wenzel hevur yvirtikið alt virksemið hjá Sp/f Komfortbilum, við undantaki av søluni av Maxus bilum, sum bert var ein avmarkaður partur av virkseminum hjá Sp/f Komfortbilum.[22]

78. Í hesum sambandi hevur tað týdning at vísa á, at í fráboðanarskjalinum verður biðið um avrit av øllum skjølum, ið føra til samanleggingina. Tær avtalur sum eru gjørdar við triðja part, tí man í grundini vil yvirtaka alt BMW-virksemi hjá Sp/f Komfortbilum eru viðkomandi fyri Kappingareftirlitið í sambandi við viðgerðina av yvirtøkuni. Somuleiðis eru tær avtalur, sum eru gjørdar við leiðsluna og lyklastarvsfólk, viðkomandi fyri tað eftirlitsuppgávu, sum Kappingareftirlitið hevur í sambandi við viðgerð av yvirtøkum, herundir um tað eru kappingarklausular settir í avtalur við fráfarandi leiðslu og eigaraskara.

79. Markvirðini fyri, nær samanleggingar sambært § 13 skulu fráboðast, eru í § 14, stk. 1 í kappingarlógini. Munur verður gjørdur á, um talan er um eina samanlegging millum partar har minst tveir hava virksemi í Føroyum, og samanlegging, har bert ein partur hevur virksemi í Føroyum. Í § 14, stk. 1, nr. 1 eru umsetningsmørkini at minst tvær fyritøkur skulu hava 15 mió. kr. í umsetningi í Føroyum og at samlaði umsetningurin hjá øllum luttakandi fyritøkum er í minsta lagi 75. mió. kr. í Føroyum. Í § 14, stk. 1, nr. 2 eru umsetningsmørkini at minst ein fyritøka skal hava 75. mió. kr. í umsetningi í Føroyum og minst ein av hinum fyritøkunum skal hava ein umsetning á 75. mió. kr. á heimsstigi.

80. Luttakandi fyritøkur eru P/f Wenzel samtakið og tær yvirtiknu virkiseindirnar hjá Sp/f Komfortbilar og Sp/f NN Finans. Sostatt er talan um eina yvirtøku har umsetningsmørkini í § 14, stk. 1, nr. 1 í kappingarlógini skulu verða rokkin, áðrenn fráboðanarskylda eftir § 16, stk. 1 í kappingarlógini fyriliggur.

81. Niðanfyri er yvirlit yvir umsetning hjá luttakandi fyritøkum í Føroyum í seinasta roknskaparári sambært fráboðanini.

Feløg	§14, stk. 1, 2. pkt.	§14, stk. 1, 1. pkt.
P/f Wenzel	>15	>75
Sp/f Komfortbilar	>15	
Sp/f NN Finans		

82. Talvan omanfyri vísir samlaða umsetningin hjá luttakandi fyritøkumnum í Føroyum sum verandi omanfyri 75 mió. kr., eins og minst tvær av fyritøkunum hava ein umsetning í Føroyum omanfyri 15 mió. kr. Sostatt er talan um eina transaktión sum kemur undir fráboðanaskylduna í §16, stk. 1 í kappingarlógini.

[22] Sp/f Komfortbilar hevur selt 8 nýggjar Maxus bilar í tíðarskeiðinum 2019 til 2024. Tríggjar í 2021, tríggjar í 2022 og tveir í 2023.

3. Marknaðarlýsing

83. Samanleggingin fer fram innan føroysku bilvinnuna. Vinnugreinin fevnir í høvuðsheitum um sølu av nýggjum bilum, sølu av brúktum bilum, verkstaðartænastur, eykalutir, garanti- og viðlíkahaldstænastur, umframt atknýttar tænastur sum fígging, leasing, bilútleigu og innflutning av bilum.

84. Talan er um eina vinnugrein, har bilasøla og søla av eftirfylgjandi tænastur hanga tætt saman (aftermarket), tí kundin ofta hevur samband við sama veitara bæði í sambandi við keyp, garanti, viðlíkahald og seinni umvælingar.

85. Á føroyska marknaðinum skilir Kappingareftirlitið millum tvey sløg av bilasølum. Tað fyrra slagið eru bilasølur, sum veita verkstaðstænastur, herundir garanti service. Hesar eru Wenzel, Waag bilar, Norðbil, Bilasølan, Reyni Service, Berg Motors og Føroya Bilasøla. Tað seinna slagið eru bilasølur, sum ikki veita verkstaðstænastur. Hesar eru t.d. Bilkeyp, Bilimport og Vinnbilar.

86. Føroyski bilmarknaðurin er lutfalsliga lítil í tali av kundum, men hevur kortini eitt breitt úrval av bilmerkjum. Hetta verður í stóran mun skipað gjøgnum fáar etableraðar bilasølur, sum hvør sær umboða fleiri bilmerki og hava tilknýtt verkstað, eykalutagoymslu og kundatænastu. Alment tøkt yvirlit yvir føroyskar bilasølur vísir, at Wenzel umboðar flest bilmerkir, hóast aðrar bilasølur á sama hátt hava fleiri merkjaumboð savnað hjá sær, t.d. Bilasølan við Volkswagen, Audi og Škoda og Reyni Service við Toyota og Lexus. Komfortbilar hevur sambært sama yvirliti verið knýtt at BMW, Fiat, Alfa Romeo, Jeep og Maxus. Í dag er Fiat hjá Berg Motors, meðan Alfa Romeo, Jeep og Maxus ikki verða seld í Føroyum.

87. Marknaðurin er tí eyðkendur við at einstøku bilmerkini bert hava eitt umboð í Føroyum. Vanliga er talan um ein søluumboð, men talan kann eisini verða um eitt verkstaðumboð, sum eisini selur ávísa bilmerkið.

88. Hetta merkir, at brúkarin kann velja ímillum einstøku bilasølurnar og millum einstøk bilmerki, men kann vanliga ikki velja ímillum fleiri veitarar av sama bilmerki. Seinnu árini eru fleiri bilasølur komnar, sum ikki veita verkstaðstænastur. Hesar hava serliga lagt seg eftir at selja brúktar bilar, men hava í avmarkaðan mun eisini innflutt nýggjar bilar. Tøl, sum Kappingareftirlitið hevur fingið frá Akstovuni, benda tó á, at bilasølurnar sum ikki veita verkstaðstænastur, nærum heilt eru givnar at innflyta nýggjar bilar. Í tíðarskeiðnum 2024 til september 2026 eru í miðal innfluttir 821 nýggir bilar inn árliga, av hesum hava bilasølur, sum ikki selja verkstaðstænastur, innflutt miðal 13 nýggjar bilar árliga. Tað svarar til 1,5% av samlaða innflutninginum.

89. Hetta hevur týdning fyri kappingarmetingina, tí intrabrand-kappingin fyri einstøku bilmerkini er avmarkað, meðan interbrand-kappingin millum ymisk merki, og kappingin millum bilasølur, fær størri týdning. Tá ein bilasøla hevur fleiri merki í sínum úrvali, kann hon bjóða kundum fleiri alternativ innan sama sølustað, samstundis sum hon hevur møguleika at binda kundan at sínum egna *eftirmarknaði* gjøgnum garanti, viðlíkahald, eykalutir og tænastusáttmálar.

90. Verkstaðartænastur fevna bæði um vanligt viðlíkahald, mekaniskar umvælingar, garantiarbeiði, feilsøking, dagføringar, eykalutir og aðrar tænastur eftir sølu. Fyri nýggjar bilar og bilar undir garanti

kann tað hava stóran týdning fyri kundan, at tænastan verður veitt av einum góðkendum verkstaði. Tað ger, at verkstaðarmarknaðurin ikki uttan víðari kann metast sum ein marknaður, har øll verkstøð eru kappingarneytar.

91. Søla av brúktum bilum er samstundis vorðin ein týðandi partur av vinnugreinini. Umframt vanligar bilasølur, eru fyritøkur settar á stovn, sum hjálpa privatkundum at innflyta brúktar bilar, herundir demo-bilar og lutfalsliga nýggjar bilar. Hesar fyritøkur kunnu skapa eitt ávíst kappingartrýst á søla av brúktum bilum og á príssetingina av nýggjum bilum. Tó er kappingartrýstið ikki neyðturviliga tað sama sum frá eini bilasølu við egnum verkstaði, garanti, eykalutum og eftirfylgjandi kundatænastu.

92. Vinnugreinin er eisini ávirkað av, at Føroyar eru ein avmarkaður landafrøðiligur marknaður við egnum skrásetingar- og avgjaldsreglum, avmarkaðum kundagrundarlagi og praktiskum viðurskiftum kring flutning, garanti og tænastu. Hóast kundar kunnu innflyta bilar úr útlandinum, er tað fyri nógvar kundar framvegis ein fyrimunur at keypa frá einum føroyskum veitara, sum kann veita ráðgeving, fígging, innbýti, garanti, viðlíkahald og skjótari atgongd til verkstað og eykalutir.

93. Sum áður víst á, so hava bilasølurnar, sum veita verkstaðstænastur, ofta umboð upp á fleiri bilmerkir. Niðanfyri sæst yvirlit yvir, hvørji bilmerkir tær føroysku bilasølurnar umboða.

Bilasølur	Umboð
P/F Bilasølan	Audi, Volkswagen, Skoda
P/F Reyni Service	Toyota, Lexus
P/F Wenzel	Volvo, Ford, Mazda, Kia, MG, Isuzu, BYD, Polestar
P/F Waag	Mercedes-benz, Hyundai, Nissan
Sp/F Berg Motors	Suzuki, Subaru, Aiways, JAC Motors, Peugeot, Citroen, Opel, Fiat, Scania
Sp/F Nordbil	Honda

94. Tey bilmerkini ið eru mest seld í Føroyum seinastu fimm árini, eru Toyota, Volkswagen, Hyundai og Ford. Hesi bilmerkini hava støðugt hvørt ár nógva sølu, og eru oftast millum tey 5 bilmerkini, ið eru mest seld í hvørjum ári í Føroyum. Niðanfyri er yvirlit yvir tíggju av mest seldu bilmerkjunum, í Føroyum bólkað eftir ári.

Top 10 - Mest seldu bilmerkir					
Nr.	2025	2024	2023	2022	2021
1	Nissan (308)	Toyota (183)	Toyota (254)	Toyota (252)	Toyota (294)
2	Toyota (304)	Nissan (137)	Volkswagen (204)	Volkswagen (235)	Kia (280)
3	Volkswagen (251)	Volkswagen (132)	Hyundai (186)	Ford (213)	Ford (240)
4	Hyundai (162)	Hyundai (131)	Ford (164)	Hyundai (167)	Volkswagen (219)
5	Ford (117)	MG (119)	Renault (148)	Vovlo (164)	Hyundai (207)
6	Renault (88)	Ford (94)	Volvo (112)	Kia (138)	Volvo (181)
7	MG (82)	Mercedes-Benz (89)	Nissan (110)	Mercedes-Benz (118)	Mercedes-Benz (126)
8	Mercedes-Benz (66)	Renault (84)	Mercedes-Benz (104)	Renault (81)	Renault (108)
9	Skoda (65)	Volvo (81)	Suzuki (95)	Audi (78)	Citroen (93)
10	Suzuki (46)	Kia (48)	Kia (72)	Citroen (71)	Suzuki (93)

95. Marknaðurin fyri innfluttar brúktar bilar er vaksandi, ið sæst á hagtølum frá Akstovuni. Í 2021 vóru 195 brúktir bilar innfluttir, samanborið við 2025 og 2024, har 262 og 275 brúktir bilar vóru innfluttir.

96. BMW, Ford og Volkswagen eru mest innfluttu bilmerkini innan brúktar bilar. Yvirhøvur eru tey dýrari merkini væl umboðaði, tá tað kemur til innflutningin av brúktum bilum. Yvirlitið niðanfyri vísur hvørji fimm bilmerki vóru mest influtt, av brúktum bilum, í tíðarskeiðinum 2021-2025.

Mest influtt merki av brúktum bilum					
Nr.	2025	2024	2023	2022	2021
1	BMW/Volkswagen (30)	BMW (46)	Volkswagen (42)	Volkswagen (26)	Volkswagen (59)
2	Mercedes-Benz (28)	Mercedes-Benz (33)	Audi (29)	BMW (18)	Ford (33)
3	Ford (25)	Ford (32)	Mercedes-Benz (17)	Ford (13)	BMW (14)
4	Volvo (23)	Audi (29)	BMW (16)	Tesla (10)	Volvo (13)
5	Toyota (20)	Volkswagen (28)	Ford/Volvo (13)	Citroen (8)	Audi (10)

97. Samlaðu roknskaparúrslitini hjá teimum føroysku bilasølunum geva ábending um, at gongdin í vinnuni hevur verið skiftandi seinastu árini, tó við framhaldandi góðum úrslitum. Í tíðarskeiðinum 2019-2024 hevur samlaða úrslitið í miðal verið 32 mió. kr., har hægsta úrslitið var 46 mió. kr. í 2021, og lægsta úrslitið var 16 mió. kr. í 2023. Niðanfyri sæst eitt yvirlit yvir samlaðu roknskaparúrslitini hjá føroysku bilasølunum, sum Kappingareftirlitið hevur úr hagtalsgrunninum hjá Hagstovuni.

Roknskaparúrslit - Samlað	2024	2023	2022	2021	2020	2019
Nettosøla	1.004.417.320	1.105.157.453	1.101.746.008	1.143.677.341	1.033.978.505	1.068.946.985
Ársúrslit	39.458.247	16.051.959	30.417.451	46.047.423	27.670.258	37.127.797
Ogn tilsamans	623.889.770	667.555.850	629.968.425	612.265.150	585.854.896	617.358.951
Eginogn	252.103.460	240.960.460	262.366.741	245.965.207	226.525.901	273.685.250

98. Kappingareftirlitið hevur til samanberingina av brúkaraprístølunum valt at nýta 2017 sum støðisár. Hagtølini av føroysku og donsku prístølunum eru fingin til vega frá Hagstovuni og Danmarks Statistik. Úrslitið av príssamanberingini er lýst í talvunum niðanfyri.



99. Prístalið, ið samanborið verur við í Danmark, er prístalið fyri nýggjar bilar, hetta av tí at størsti partur av bilum, ið vera innfluttir, eru nýggir bilar. Í 2025 vóru 2044 nýggj akfør skrásett, og 400 akfør skrásett av innfluttum brúktum akførum.

100. Sambært hagtølum frá Hagstovu Føroya er føroyska brúkaraprístalið, um 2017 verður sett sum støðisár, hækkað 23% fram til 2026. Prístalið á bilum er í sama tíðarskeiðið hækkað 12,1%. Hagtølini vísa at prísvøksturin á bilum hækkar ikki eins skjótt sum vanligi prísvøksturin í Føroyum hetta tíðarskeiði.

101. Um samanborið verður við danska brúkaraprístalið fyri sama tíðarskeið, sæst at brúkaraprístalið í Danmark er hækkað 20% síðan 2017. Í sama tíðarskeiði er prístalið á nýggjum bilum hækkað 7% í

Danmark. Hetta kann geva ábending um, at hækkingin í føroyska prístalinum fyri akfarskeyp kann partvíst greinast sum ein fylgja av prísvøkstri hjá donsku veitarum.

4. Meting

102. Í §15, stk. 2 í kappingarlógini er ásett metingarstøði, sum skal brúkast í sambandi við viðgerð av eini yvirtøku:

> "Stk. 2. Ein samanlegging, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal góðkennast. Ein samanlegging, sum munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal forbjóðast."

103. Ásetingin sigur, at um ein samanlegging munandi forðar fyri virknari kapping, uttan mun til hvat orsøkin er, so skal hon forbjóðast. Talan er um tí sokallaðu SIEC-testina, (Significant Impediment of Effective Competition), ið heimilar Kappingarráðnum at forbjóða samanleggingum, sum av eini ella aðrari orsøk kunnu forða fyri virknari kapping, eisini hóast tær ikki skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu. Til dømis um talið av fyritøkum á marknaðinum longu er avmarkað, og umstøðurnar fyri tigandi samskipan eru til staðar.

104. Fyri at meta um, hvørt ein samanlegging munandi kann forða fyri virknari kapping, er neyðugt at skilmarka teir viðkomandi marknaðir, sum samanleggingin hevur ávirkan á.

4.1. Skilmarking av viðkomandi marknaði

105. Tá metast skal um í hvønn mun ein yvirtøka kann avmarka kappingina á marknaðinum, er neyðugt at skilmarka tann marknað, sum yvirtøkan fær ávirkan á.

106. Í § 5 í kappingarlógini er ásett, at eftirspurningsvaraseting, útboðsvaraseting og møgulig kapping skulu kannast í sambandi við skilmarking av viðkomandi marknaði. Hetta er fyri at staðfesta í hvønn mun fyritøkan er undir kappingarligum trýsti. Ásetingin skal skiljast soleiðis, at varasetingin í øllum førum skal kannast, meðan møgulig kapping bert skal kannast, um tað er neyðugt.

107. Í sambandi við skilmarkingina av viðkomandi marknaði, skulu bæði viðkomandi vørumarknaður og viðkomandi landafrøðiligi marknaður staðfestast. Hetta merkir, at kanningin skal staðfesta, um aðrar vørur eru á marknaðinum, sum kunnu koma ístaðin fyri tær vørur, sum partarnir veita, eins og tað landafrøðiliga vavið á marknaðinum skal staðfestast. Landafrøðiligi marknaðurin er økið, har partarnir umseta ella avtaka vørur, og har kappingarligu umstøðurnar eru líkar.

4.1.1. Marknaðurin fyri sølu av nýggjum bilum

108. Fyri at skilmarka viðkomandi vørumarknað verður vanliga ein SSNIP-test[23] brúkt. Í SSNIP-testini verður hugt eftir, um ein hypotetiskur monopolistur á lønandi hátt kundi hækkað prísin á einari ávísari vøru. Í ítøkiliga málinum er talan um nýggjar BMW bilar, og um prísirnir á hesum varandi kunnu hækkast við 5-10%, ella um kundar heldur høvdu skift til onnur bilmerkir. Um kundarnir

[23] **S**mall but **S**ignificant and **N**on-transitory **I**ncrease in **P**rices

heldur skiftu til t.d. Mercedes-Benz, men ikki til VW, so er Mercedes-Benz á viðkomandi marknaðinum, meðan VW ikki er á viðkomandi marknaðinum.

109. Tað hevur týdning í sambandi við príshækkingar hvussu prísviðkvæmar vørur eru. Taka vit gerandisvørur, so eru hesar vørur ofta sera prísviðkvæmar, har sjálvt smærri príshækkingar á t.d. 5% kunna hava týdning fyri um kundar skifta.

110. Hinvegin eru bilar ofta ein minni prísviðkvæm vøra, tí her spæla onnur viðurskifti inn, sum t.d. vørumerkið og sosial virðing. Tað er t.d. sannlíkt at ein 5-10% príshækking á einum nýggjum BMW 5 series vildi gjørt at kundar skifti yvir til Audi A6, Mercedes E-Class, Volvo XC90 ella Lexus RX heldur enn til Dacia Sandero ella Skoda Fabia.

111. Hinvegin eru eisini kundabólkar, har prísurin vigar nógv, og sum í roynd og veru bara ynskja ein flutningstørv nøktaðan. Hesir kundabólkar eru ofta kvikari at skifta til onnur bilmerkir, um prísurin á einum bili hækkar við 5-10% í mun til aðrar sambærligar bilar.

112. Í kappingarrættarligari meting av bilmarknaðum verður ofta hugt eftir, um nýggir bilar skulu viðgerast sum ein breiður marknaður, ella um marknaðurin kann býtast í smalari bólkar. Ein møguligur og einfaldur leistur er at skilja millum luksus bilar, premium-merkja bilar, mass-market bilar.

113. Slík flokking er tó ikki avgerandi í sær sjálvari. Tað avgerandi er, um kundarnir, sum svar upp á eina lítla, men varandi príshækking á einum bili í einum bólki, í veruleikanum høvdu skift til bilar í einum øðrum bólki. Um ein týðandi partur av kundunum hevði skift, talar tað fyri, at bólkarnir eru partur av sama viðkomandi marknaði. Um kundarnir hinvegin í høvuðsheitum halda seg til sama bólk, talar tað fyri, at bólkurin kann mynda ein smalari viðkomandi marknað.

114. Premium merkja bilar eru vanliga eyðkendir av hægri prísi, sterkari brand og større denti á dygd, komfort, útgerð, trygd og eftirfylgjandi tænastu. Slíkir bilar verða ofta keyptir av kundum, sum leggja serligan dent á merki, eginleikar, tænastustøði og sosiala virðing.

115. Mass-market bilar eru hinvegin vanliga ætlaðir einum breiðari kundabólki, har prísur, praktisk nýtsla, rakstrarkostnaður og virði fyri pengarnar hava størri týdning.

116. Hetta bendir á, at kundar í premium-segmentinum í størri mun síggja onnur premium-merki sum nærliggjandi alternativ, meðan vanlig mass-market merki vanliga leggja eitt meira avmarkað kappingartrýst á premium-bilar.

117. Interbrand-kapping er kappingin millum ymisk bilmerki, t.d. millum BMW, Audi, Mercedes-Benz, Volvo, Lexus og onnur premium-merki. Intrabrand-kapping er hinvegin kappingin millum ymiskar veitarar av sama bilmerki, t.d. kappingin millum sjálvstøðugar BMW bilasølur.

118. Munurin hevur serligan týdning í hesum máli, tí føroyski bilmarknaðurin er skipaður soleiðis, at hvørt bilmerki vanliga bert hevur eitt autoriserað umboð í Føroyum – antin eitt søluumboð ella eitt verkstaðsumboð. Tað merkir, at intrabrand-kappingin fyri einstøku merkini er sera avmarkað, og at tað kappingartrýst, sum kundarnir møta, í høvuðsheitum kemur frá interbrand-kapping millum ymisk merki og bilasølur.

119. Tá P/f Wenzel við yvirtøkuni fær BMW afturat sínum verandi premium-merkjum, verður eitt týdningarmikið interbrand-kappingartrýsti millum BMW og premium-merkini hjá Wenzel

internaliserað.[24] Hetta hevur týdning fyri metingina av, um yvirtøkan kann minka kappingartrýstið, og harvið geva Wenzel størri møguleika at hækka prísir ella minka avsláttir, og harvið munandi forða fyri virknari kapping.

120. Kappingareftirlitið metir, at interbrand kappingin, sum er viðkomandi í mun BMW-bilmerki, serliga kemur frá øðrum premium-merkjum. Í Føroyum eru hesi serliga Audi, Mercedes, Volvo, Lexus, men Tesla, Range Rover og Land Rover eru eisini í ávísan mun seld í Føroyum.

121. Tað kann væl hugsast, at brúkarar kunnu varaseta eina standard útgávu av einum BMW til eitt sambærligt model av vanligu bilmerkjunum, sum Toyota, Ford, Kia, Opel, Peugeot, men aftur her er spurningurin, um talan er um ein veruligan substitutt, tí samanborið verður millum bilar við øgiliga ymiskum eginleikum og hentleikum. Tað er ivasamt um ein BMW-keypari hevði skift eitt av vanligu bilmerkjunum, sum svar upp á eina lítla varandi príshækking á 5-10%.

122. Í Føroyum er trýstið frá intrabrand-kapping meira avmarkað, tí her er bert eitt umboð fyri hvørt bilmerki. Tó so, finnast bilasølur, ið ikki umboða nakað bilmerki, og sum innflyta bilar í kapping við umboðssølurnar, men í flestu førum er talan um brúktar bilar.

123. Kappingareftirlitið metir ikki at innfluttu brúktu bilarnir eru á sama viðkomandi marknaði. Ein brúkari sum umhugsar at keypa ein BMW 5-series fer neyvan at keypa ein brúktan BMW 5-series um hesin bert er 5-10% bíligari enn ein nýggjur BMW 5-series frá einum umboði.

124. Kappingareftirlitið metir, at lítið brúktir BMW-bilar frá teimum óheftu bilasølunum uttan iva leggja eitt ávíst trýst á søluna av nýggjum BMW-bilum, men talan er ikki um eina veruliga varaseting, tí hesir bilar mugu seljast 100.000-200.000 krónur bíligari enn ein nýggjur BMW verður seldur fyri í Føroyum.

125. Kappingareftirlitið metir, grundað á eftirspurningsvarasetingina, at viðkomandi vørumarknaðurin er søla av premium-merkja bilum, sum t.d. BMW, Audi, Mercedes, Volvo og Lexus.

126. Viðvíkjandi útboðsvaraseting, so metir Kappingareftirlitið at byrjunarkostnaðurin fyri at byrja sølu av nýggjum bilum í Føroyum liggur um einar 1-2 mió. kr., men tað er ósannlíkt at ein nýggjur aktørur fær umboð upp á eitt av teimum merkjum sum longu eru í Føroyum. Somuleiðis eru krøvini frá einstøku bilverksmiðjunum ymisk og hevur hetta ávirkan á íløgukostnaðin. Undir øllum umstøðum kann ikki væntast at ein bilverksmiðja hevði játtað rættin til umboðssølu, um umsøkjari ikki hevur verkstað. Hetta hækkar íløgukostnaðin til eini 5 mió. kr.

127. Bilverksmiðjur við teimum meira kendu merkjunum seta ofta høg krøv til tey sum vilja gerast umboð. Sambært P/f Wenzel eru slík krøv ein orsøk til at felagið bert hevur søkt um at gerast BMW serviceverkstað og ikki umboð.

128. Landafrøðiliga metir Kappingareftirlitið, at viðkomandi marknaðurin er Føroyar. Føroyskir kundar kunnu í ávísum førum keypa ella innflyta nýggjar BMW-bilar úr útlandinum, men slíkur innflutningur er knýttur at flutningi, skráseting, avgjøldum, og møguliga avbjóðingum í mun til garanti, og service. Fyri nógvar kundar hevur tað týdning at keypa frá einum føroyskum veitara, og harvið fáa atgongd til ein veitara, sum kann veita ráðgeving, fígging, viðlíkahald og

garantiumvælingar. Kappingarviðurskiftini fyri sølu av nýggjum BMW-bilum í Føroyum eru tískil ikki tey somu sum í grannalondunum

129. Kappingareftirlitið hevur, umvegis Akstovuna, fingið staðfest, at nærum eingin privatur innflutningur er av nýggjum bilum.

130. Niðurstøðan er sostatt, at viðkomandi vørumarknaðurin er søla av nýggjum premium-bilum í Føroyum. Kappingareftirlitið viðurkennir tó, at tá slík mál mál hava verið viðgjørd av ES Kommissiónini, hevur vanliga siðvenjan verið at skilmarkað viðkomandi marknað til sølu av nýggjum bilum, og annars lata møguleikan verða opnan fyri eini nærri skilmarking.[25] Kappingareftirlitið fer tí at gera sína marknaðarkanning við støði í bæði tí neyvaru og tí breiðaru skilmarkingini av viðkomandi marknaði.

Landafrøðiliga skilmarkingin er avmarkað til Føroyar. Allar bilasølurnar, sum veita verkstaðstænastur, eru staðsettar í Tórshavn, og bert ein av teimum hevur deild aðrastaðni. Hetta stuðlar undir, at skilmarkingin ikki eigur at verða neyvari enn Føroyar. Somuleiðis er innflutningurin av nýggjum bilum, sum ikki fer umvegis bilasølurnar, rættuliga avmarkaður, og er hetta greitt tekin um, at útlendskar bilasølur uttanfyri Føroyar ikki eru virknar á tí føroyska marknaðinum.

4.1.2. Marknaðurin fyri sølu av brúktum bilum

131. Viðvíkjandi eftirspurningsvarasetingini er spurningurin, um eftirspurningurin fevnir um allar brúktar bilar, uttan mun til, um talan er um innfluttar brúktar bilar, brúktar bilar, sum eru innkomnir hjá bilasølunum í sambandi við sølu av nýggjum bili, ella brúktar bilar, sum eru seldir í privatari sølu. Yvirtikna virksemið snúði seg um at selja brúktar bilar, herundir brúktar BMW-bilar.

132. Kappingareftirlitið hevur innsavnað hagtøl frá Akstovuni, sum lýsa innflutningin av ávikavist brúktum eins og nýggjum bilum. Yvirskipað kann sigast, at tað yvirhøvur eru bilasølur uttan verkstað, sum innflyta brúktar bilar, meðan bilasølur við verkstaði bert í avmarkaðan mun innflyta brúktar bilar, og at hóast privatur innflutningur av brúktum bilum fer fram, er hesin sera avmarkaður í mun til samlaða innflutningin av brúktum bilum. Hetta síðsta kemur uttan iva av, at tað eru rættuliga nógv viðurskifti sum skulu fáast í rættlag í sambandi við innflutning av bilum til Føroya.

133. Kappingareftirlitið metir, at nøkur av somu viðurskiftum gera seg galdandi í sambandi við varaseting av brúktum bilum sum nýggjum bilum. Hetta skilt á tann hátt, at brúkarar sum umbiðja tey minni kendu bilmerkini eru meira prísviðkvæmir, tí teir leggja fyrst og fremst vekt á at nøkta ein flutningstørv, meðan brúkarar sum umbiðja dýrari merkir, sum t.d. BMW, eru minni prísviðkvæmir, tí hentleikar, dygd og sosial virðing hava størri týdning.

134. Í sambandi við varaseting av útboðnum metir Kappingareftirlitið at gáttin til marknaðin er lág, tí somu krøv um sýnisgluggar og verkstað ikki eru til staðar, sum til bilasølurnar við verkstaði. Í grundini kann slíkt virksemi byrjast sum millumlið millum ein føroyskan keypara og eina útlendska bilasølu.

[25] M.8309 – VOLVO CAR Corportation/First Rent a Car, reglubrot 14, dagfest. 26.07.2017

135. Tað sæst eisini í dag at hetta virksemi ofta verður rikið saman við øðrum virksemi, millum annað er ikki óvanligt at hetta virksemi verður rikið saman við útleiguvirksemi, har fyritøkur í fyrstu atløgu innflyta nýggjar bilar til útleiguvirksemi, og hareftir selja bilarnar eftir 1-3 ár sum lítið brúktar bilar.

136. Tó krevur eitt kappingarført og varandi virksemi innan brúktbilasølu vanliga kapital til goymslu, atgongd til innkeypsrásir, høli, kunnleika um skráseting og avgjøld, søluførleikar.

137. Landafrøðiliga metir Kappingareftirlitið, at marknaðurin fyri sølu av brúktum bilum í hesum máli er Føroyar. Føroyskir kundar kunnu keypa brúktar bilar úr útlondum, og hetta kann leggja eitt ávíst kappingartrýst á føroyskar veitarar.

138. Niðurstøðan er tí, at viðkomandi vørumarknaðurin í hesum máli skal skilmarkast sum marknaðurin fyri sølu av brúktum bilum. Privat søla, privatur innflutningur og nýggir bilar kunnu leggja eitt ávíst kappingartrýst á, men eru ikki í øllum førum fullgóðir substituttar fyri professionella sølu av brúktum bilum í Føroyum. Viðkomandi landafrøðiligi marknaðurin verður skilmarkaður sum Føroyar.

4.1.3. Marknaðurin fyri verkstaðstænastur

139. Viðvíkjandi eftirspurningsvarasetingini er spurningurin, um kundar, sum umbiðja verkstaðstænastur, herundir verkstaðstænastur til BMW, kunnu skifta til onnur verkstøð enn tey, sum eru knýtt at einum umboði ella umboðslíknandi bilasølu, um prísurin á verkstaðstænastum hjá hesum varandi hækkar 5-10%.

140. Kappingareftirlitið metir, at verkstaðstænastur fevna um fleiri sløg av tænastum, herundir vanligt viðlíkahald, mekaniskar umvælingar, feilsøking, garantiarbeiði, software-dagføringar, skaðaumvælingar og nýtslu av eykalutum.

141. Fyri eldri bilar uttan garanti kann ein kundi í størri mun velja millum ymisk óheft verkstøð, autoriserað verkstøð og í ávísum førum gera einfaldari arbeiði sjálvur. Hetta kundi bent á, at eisini tænastur frá óheftum verkstøðum og tænastur frá øðrum verkstøðum kunnu varasetast fyri ávísu tænastuna.

142. Fyri nýggjari bilar, bilar undir garanti og bilar, har serligur merkja kunnleiki, diagnosutól, software, originalir eykalutir ella skjalprógvað tænastusøga hava týdning, er eftirspurningsvarasetingin meira avmarkað. Kundar kunnu tá hava ein sterkan áhuga í at nýta autoriserað verkstað, tí hetta kann hava týdning fyri trygd, garanti og virðið á bilinum.

143. Óheft verkstøð eru tískil ikki altíð ein fullgóður substituttur fyri góðkend verkstøð og rættast er nokk at tænastur frá óheftum verkstøðum eru sum meginregla ikki substituttar fyrr enn garantiið gongur út.

144. At gerast autoriserað verkstað krevur vanliga tíð, íløgur, starvsfólkaførleikar og avtalu við danskt ella norðurlendskt umboð. Onnur verkstøð kunnu tí ikki uttan víðari við stuttum skotbrái leggja sítt virksemi um fyri at veita allar tær tænastur, sum eitt autoriserað verkstað kann veita.

145. Landafrøðiliga metir Kappingareftirlitið, at viðkomandi marknaðurin er Føroyar. Verkstaðstænastur krevja vanliga, at bilurin verður fluttur til verkstaðið, og kundin hevur tørv á skjótari og praktiskari tænastu. Hóast tað í ávísum førum ber til at senda ein bil, ella ein part av

einum bili, uttanlands, er hetta ikki eitt veruligt alternativ fyri vanligar umvælingar, viðlíkahald, garantiarbeiði ella bráðfeingis tænastu.

146. Niðurstøðan er tí, at viðkomandi vørumarknaður í hesum máli skal skilmarkast sum marknaðurin fyri verkstaðstænastur. Í kappingarligu metingini kann tað tó vera neyðugt at leggja serligan dent á undirsegmentið fyri autoriseraðar ella merkiskønar verkstaðstænastur, serliga fyri nýggjari bilar, garantiarbeiði og tænastur, har atgongd til seramboð, eykalutir, software og førleikar hevur týdning. Viðkomandi landafrøðiligi marknaðurin verður skilmarkaður sum Føroyar.

4.2. Ávirkan á kappingina

147. Í §15, stk. 2 í kappingarlógini er ásett metingarstøði, ið skal nýtast í sambandi við viðgerðina av fráboðaðum samanleggingum. Metingarstøðið í føroysku kappingarlógini er sama metingarstøðið sum er at finna í ES fyriskipan 139/2004 um eftirlit við miðsavningum millum fyritøkur[26], og verður vanliga nevnd SIEC metingarstøði.[27]

148. Kappingareftirlitið brúkar ES vegleiðingina um vatnrættar samanleggingar[28] í sambandi við viðgerðina av fráboðanum samanleggingum millum kappingarneytar. Í vegleiðingini verður víst á viðurskifti, sum kunnu hava týdning í sambandi við eina viðgerð av eini samanlegging, men ætlanin við vegleiðingini er ikki at hon skal verða ein minnislisti, sum farast skal í gjøgnum í hvørjum málið. Heldur eigur ein viðgerð at byggja á eina samlaða meting av hvørjar avleiðingar kunnu væntast av eini samanlegging við støði í viðkomandi viðurskiftum og umstøðum.[29]

149. Marknaðarpartar og miðsavningin kunnu geva eina ábending um marknaðarbygnað og kappingarliga týdningin av teimum luttakandi fyritøkunum og øðrum kappingarneytum.[30]

150. Yvirskipað eru tveir hættir, sum ein vatnrøtt samanlegging munandi kann forða fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi støðu. Hesir eru:

1. Einsæris árin (non-coordinated effects), har týðandi kappingarligt trýst á fyritøku avmarkast, soleiðis at fyritøkan fær økt marknaðarvald.

Dømi um tílíkt árin er tá ein fyritøka yvirtekur sín størsta kappingarneyta. Áðrenn samanleggingina vildi flestu kundar hjá fyritøkuni møguliga flýggjað til kappingarneytan, um fyritøkan økti um sinar prísir. Eftir samanleggingina er hesin møguleiki burtur og tí kann ein møgulig prísøking føra til øktan vinning.

2. Samskipað árin (coordinated effects), har kappingarligu umstøðurnar verða somikið broyttar, at fyritøkur, sum undan yvirtøkuna ikki samskipaðu sína framferð, eftir yvirtøkuna meira sannlíkt kunnu samskipa og hækka prísirnar, ella á annan hátt skaða virknu kappingina.

---

[26] Council Regulation (EC) No 139/2004 of 20 January 2004 on the control of concentrations between undertakings
[27] **S**ignificant **I**mpediment to **E**ffective **C**ompetition
[28] Guidelines on the assessment of horizontal mergers under the Council Regulation on the control of concentrations between undertakings (2004/C 31/03)
[29] Guidelines on the assessment of horizontal mergers under the Council Regulation on the control of concentrations between undertakings (2004/C 31/03), reglubrot 13
[30] Guidelines on the assessment of horizontal mergers under the Council Regulation on the control of concentrations between undertakings (2004/C 31/03), reglubrot 14

Somuleiðis kunnu samskipað árin av eini yvirtøku føra til, at samskipan, sum longu fer fram á marknaðinum, gerst lættari og skaðiligari.

Dømi um slíkt árin er um fyritøka, sum hevur verið ein vargur á einum miðsavnaðum marknaði, verður keypt av einum kappingarneyta. Eftir keypið er munandi lættari hjá verandi fyritøkum at samskipa teirra framferð.

151. Umframt einsæris og samskipað árin, er eisini viðkomandi at kanna atgongdina til viðkomandi marknaðin, og um ein yvirtøka førir til virknisfyrimunir.

152. Afturat hesum viðurskiftum nevnir ES vegleiðingin ávís viðurskifti, sum kunnu hava týdning undir serligum umstøðum, og hvussu ES kommissionin ber seg at í teimum førum. Hesar serligu umstøður eru:

1) yvirtøka av einum møguligum kappingarneyta, t.e. yvirtøka av eini fyritøku, sum enn ikki er á viðkomandi vøru- ella landafrøðiliga marknaði, men sum kundi traðka inn á marknaðin,
2) yvirtøka sum førir til økta marknaðarmegi á einum ovara marknað til viðkomandi marknað, og
3) yvirtøkur har kundaskarin hevur marknaðarmakt.

153. Kappingareftirlitið metir ikki, at støðurnar sum eru umrøddar í reglubroti 152 eru viðkomandi í hesum máli.

154. Kappingareftirlitið metir, at yvirtøkan hevur serliga ávirkan á marknaðin fyri sølu av nýggjum bilum. Marknaðurin fyri sølu av brúktum bilum er meira fjøltáttaður, og kundin er, sum meginregla, minni bundin at sínum veitara á hesum marknaði. Somuleiðis er við verkstaðstænastum, har veitarasíðan er fjøltáttað, og eftir føroyskum viðurskiftum eru eisini nógvir veitarar. Monopolstøðan í sambandi við garanti-service er ikki ávirkað av hesi yvirtøku, men talan er partvís um eina grundleggjandi fortreyt í hesum marknað og partvís at støddin á marknaðinum ger at tað koma ikki aðrir veitarar innan hetta økið.

4.2.1. Marknaðarpartar og miðsavning

155. ES Kommissiónin brúkar marknaðarpartar og miðsavning sum eina innleiðandi ábending um marknaðarbygnaðin og um kappingarstøðuna hjá luttakandi fyritøkunum og teirra kappingarneytum.[31]

156. Sambært ES vegleiðingini um vatnrættar samanleggingar, kann ein marknaðarpartur á 50% ella meira, í sjálvum sær vera ein sterk ábending um eina ráðandi støðu.[32] Marknaðarpartar millum 40% og 50%, og í ávísum førum eisini undir 40%, kunnu eisini benda á marknaðarvald, um onnur viðurskifti stuðla hesum.[33] Hinvegin metir Kommissiónin vanliga, at samanleggingar, har

[31] Guidelines on the assessment of horizontal mergers under the Council Regulation on the control of concentrations between undertakings (2004/C 31/03), reglubrot 14
[32] Guidelines on the assessment of horizontal mergers under the Council Regulation on the control of concentrations between undertakings (2004/C 31/03), reglubrot 17
[33] Guidelines on the assessment of horizontal mergers under the Council Regulation on the control of concentrations between undertakings (2004/C 31/03), reglubrot 17

marknaðarparturin eftir samanleggingina er undir 25%, ikki geva ábending um kappingarligar trupulleikar.[34]

157. Vanliga verða marknaðarpartar og miðsavning roknaðir í mun til teir viðkomandi marknaðirnar. Hetta er eisini gjørt í hesum máli, har hesar útrokningar eru at finna í 4.2.1.1. til 4.2.1.4. Kappingareftirlitið hevur tó eisini valt at hyggja eftir samlaða virkseminum, tí seinastu árini er talið av bilasølum líðandi lækkað, og tað tískil kann verða gagnligt at hyggja eftir gongdini hjá føroyskum bilasølum.

158. Í sambandi við metingina av marknaðarpørtum og miðsavning hevur Kappingareftirlitið innsavnað tøl frá TAKS, sum lýsa nettosøluna hjá teimum bilasølum, sum hava verkstað. Av tí at yvirtøkan var framdd í 2025 eru tølini í talvuni niðanfyri frá 2024.

Talva 4.2.1A: Marknaðarpartar árini 2020 til 2024 og metta marknaðarbýti eftir yvirtøkuna

Alt virksemi	2020	2021	2022	2023	2024	Ex-post
Wenzel	[10-20]%	[20-30]%	[20-30]%	[30-40]%	[20-30]%	[30-40]%
Komfortbilar	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[5-10]%	[5-10]%	
Reyni Service	[10-20]%	[10-20]%	[20-30]%	[20-30]%	[20-30]%	[20-30]%
Bilasølan	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%
Waag	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[20-30]%	[20-30]%
Norðbil	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%
Bilrøkt	[5-10]%	[5-10]%				
Autoservice	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%			
Berg Motors	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%

www.taks.fo

159. Talvan omanfyri vísir, at marknaðarparturin hjá P/f Wenzel øktur úr [10-20]% til [30-40%] í eitt 5 ára skeið. Verður yvirtøkan av Sp/f Komfortbilum loyvd, økist marknaðarparturin upp í [30-40]%. Síðani 2023 hevur marknaðarparturin hjá P/f Wenzel ligið omanfyri tað sum ES Kommissiónin vanliga metir verða yvirtøkur sum ikki skapa kappingarlig ivamál.

160. Men avbjóðingarnar við størri miðsavning snúgva seg ikki einans um marknaðarráðandi støður, men eisini um marknaðarbygnað. Størri miðsavning økir eisini um sannlíkindini fyri bæði tigandi samskipan og ítøkiliga samskipan, t.d. prískartel.

161. Eitt lyklatal, sum ofta verður brúkt, tá metast skal um miðsavningina er CR3, ið vísir hvussu stóran part av samlaða marknaðinum tríggjar av størstu fyritøkunum hava ræðið á. Eftir yvirtøkuna koma tríggjar av størstu bilasølunum at hava [70-80]% av samlaða marknaðinum, meðan CR3 í 2020 var [50-60]%. Tað framgongur eisini av talvuni, at tríggjar tær størstu bilasølurnar hava økt sín marknaðarpart í tíðarskeiðinum, samstundis sum tvær bilasølur eru farnar av marknaðinum,

[34] Guidelines on the assessment of horizontal mergers under the Council Regulation on the control of concentrations between undertakings (2004/C 31/03), reglubrot 18

nevniliga Bilrøkt og Komfortbilar, og ein onnur, Autoservice, er løgd saman við aðari bilasølu, nevniliga Waagbilar.

162. ES Kommissiónin brúkar eisini Herfindahl-Hirschman-indeksið, vanliga nevnt HHI, sum eitt amboð til at meta um miðsavningina á marknaðinum áðrenn og eftir eina samanlegging. HHI verður roknað við at leggja saman kvadratið av marknaðarpørtunum hjá øllum fyritøkum á viðkomandi marknaði. Indeksið kann liggja millum nærum 0 og 10.000, har 0 svarar til ein marknað við fullkomnari kapping, meðan 10.000 svarar til ein monopol marknað.

163. Talan er tó ikki um nøkur lógarásett mørk, men um mørk, sum eru vegleiðandi ábendingar. Tað kunnu verða onnur viðurskifti sum gera, at samanleggingar, sum liggja innanfyri mørkini, kortini skapa kappingarlig ivamál.

164. Á myndini 4.2.1A sæst herfindahl indeksið í mun til ávísar marknaðarbygnaðir, sum kunnu knýtast at hesum indeksi. Í búskaparfrøðini eru eisini aðrir marknaðarbygnaðir, t.d. tilsvarandi bygnaðir fyri eftirspurningssíðuna. Nevnast kann Monopsony, har bert ein keypari er og monopolistisk kapping, har vørurnar eru líkar men ikki eins.

165. ES vegleiðingin hevur nøkur mørk grundað á HHI og broytingina í HHI (delta), har ES kommissiónin metir, at tað er ósannlíkt at hon vil staðfesta kappingarlig ivamál, um miðsavningin og broytingin liggja undir hesi mørk í sambandi við eina samanlegging. Hesi mørk eru ásett um "Trygg havn" á mynd 4.2.1A. Talan er ikki um lógarásett mørk og ein kappingarmyndugleiki kann framvegis ávísa kappingarlig ivamál í slíkari samanlegging, men talan er um eina innleiðandi ábending og ein nærri kanning av t.d. einsæris árinum kann føra til annað úrslit.

Mynd 4.2.1A: Herfindahl indeksi, marknaðarbygnaðir og *"tryggar havnir"*



166. Fyrsta "trygga havnin" er har HHI er 0 til 1000. Í tílíkum føri vil marknaðarbygnaðurin verða merktur av virknari kapping við nógvum veitarum, har eingin veitari hevur marknaðarmakt. Næsta "trygga havnin" er millum 1000 og 2000 HHI, har broytingin bert er 250. Her er talan um ein oligopolmarknað, har ávís miðsavning er. Kanska er talan um nakrar størri veitarar sum hava eitt ávíst marknaðarvald, men sum verða hildnir aftur av kappingarligum trýsti frá smærri veitarum, og tískil er torførari hjá oligopolistunum at hækka prísirnar. Umstøðurnar fyri tigandi samskipan og ítøkiligari samskipan eru ikki góðar. Triðja og síðsta "trygga havnin" er tá HHI er frá 2000 og upp eftir. Talan er tá um marknaðarbygnaðir sum antin eru oligopol, duopol ella monopol. Talan er í øllum førum um marknaðir við sera fáum veitarum, við veikari kapping og har møguleikin fyri at stýra marknaðinum eru góðar antin umvegis tigandi samskipan, ítøkiligar samskipan ella umvegis monopolvald. Talan er um "trygga havn" um broytingin er minni enn 150. Sum dømi kann vísast á, at fyri eina samanlegging sum førir til at marknaðurin fer fra duopoli til monopol skal fyritøkan

sum verður yvirtikin í mesta lagi hava ein marknaðarpart á 0,76% av marknaðinum. Tað vil siga at talan er um eina fyritøku sum lítla ella onga ávirkan hevur á størri fyritøkuna.

167. Á strikumyndini niðanfyri sæst gongdin í HHI indeksinum fyri samlaða virksemi hjá umboðsbilasølunum.

Strikumynd: 4.2.1B: Gongdin í HHI-indeksinum frá 2020 til 2025



168. Í fyrsta lagi skal vísast á, at HHI indeksið hevur verið støðugt vaksandi síðani 2020. Orsøkin er partvís orsakað av teimum yvirtøkum sum longu hava verið og partvíst orsakað av at stóru bilasølurnar hava tikið marknaðarpart frá hinum. Í 2022 yvirtók P/f Wenzel fyritøkuna Sp/f Bilrøkt og í 2023 yvirtók Sp/f Waag felagið Sp/f Autoservice frá P/f Reyni Service. [35,36]

169. Undan yvirtøkuni av Sp/f Bilrøkt lá HHI indeksið á 1453. HHI omanfyri 0 og upp til 1000 eru marknaðir við virknari kapping. Omanfyri 1.000 og upp til 2.000 er talan um ein marknaðarbygnað sum er oligopolistiskur, men har oligopolistarnir vanliga eru undir kappingarligum trýsti frá smærri veitarum. Eftir Sp/f Bilrøkt yvirtøkuna øktist HHI indeksið so líðandi til eitt støði sum er omanfyri 2000, har ein oligopolmarknaður ofta er eyðkendur við oligopolistum sum hava størri marknaðarvald, millum annað við at bæði tigandi og ítøkilig samskipan gerst einfaldari at útinna.

170. Yvirtøkan av virkseminum hjá Sp/f Komfortbilum vil føra til at HHI fyri samlaða virksemið fer upp á 2.335, sum er ein broyting á 308. Eftir vegleiðingini hjá ES kommissiónini er talan um eina yvirtøku, har man ikki uttan víðari kann siga at hon ikki skapar kappingarlig ivamál, tí broytingin (delta) er meira enn tvífaldað markvirðið, ið er sett í vegleiðingini hjá ES kommissiónini.

4.2.1.1. Viðkomandi marknaðurin fyri sølu av nýggjum persónbilum

171. Akstovan hevur hagtøl sum lýsa innflutningin av nýggjum akførum, býtt á merki og modell, og sambært hagstovuni er tað nærum bert bilasølurnar sum innflyta egin merkir. Kappingareftirlitið hevur tí valt at roknað marknaðarpartar grundað á innflutningstølini. Fyrivarni skal takast fyri, at

[35] Mál nr.: 22/00338: P/f Wenzel yvirtekur Sp/f Bilrøkt
[36] Mál nr.: 23/00406: P/f Waag yvirtekur P/f Auto Service

innflutningstøl eru vald framum nettosøluna, tí møgulig hægri príseting orsaka av marknaðarvaldi trínur ikki fram í marknaðarpørtunum.

172. Kappingareftirlitið tekur ikki undir við P/f Wenzel um, at leigubilar eiga at strikast úr dátugrundarlagnum. Í dátagrundarlagum eru eisini akfør til arbeiðsbrúk, og tískil tykist tað ógrundað at taka leigubilar úr dátugrundarlagnum Kappingareftirlitið hevur tó, fyri at ganga ynskjunum hjá P/f Wenzel á møti, tikið øll akfør úr dátugrundarlagnum sum hava við útleigan at gera.

173. Í fylgiskjali 1 síggjast útrokningarnar við leigubilum íroknað í dátagrundarlagnum, og Kappingareftirlitið kann staðfesta, at uttan mun til, hvørt roknað verður við ella uttan leigubilar, verður niðurstøðan hin sama.

174. Í talvuni niðanfyri sæst talið av nýggjum innfluttum bilum fyri hvørja bilasølu og marknaðarparturin hjá hvørjari bilasølu í 2019-2023 grundað á tal av innfluttum bilum.

Talva 4.2.1.1A: Marknaðarpartar og HHI fyri árini 2019 til 2023 og ex-post marknaðarpartar og HHI$^{ex\text{-}post}$

Innflutningur av nýggjum persónbilum	2019	2020	2021	2022	2023	Ex-post
Wenzel	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[20-30]%	[20-30]%
Komfortbilar	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	0%
Reyni Service	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%
Bilasølan	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%
Waag	[20-30]%	[10-20]%	[20-30]%	[20-30]%	[20-30]%	[30-40]%
Berg Motors	[10-20]%	[5-10]%	[5-10]%	[0-5]%	[5-10]%	[5-10]%
Norðbil	[5-10]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%
Autoservice	[10-20]%	[10-20]%	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%	0%
Aðrir	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%
HHI	**1535,4**	**1390,9**	**1347,7**	**1480,7**	**1643,4**	**2142,8**

Kelda: Akstovan, egnar útrokningar hjá Kappinareftirlitinum

Viðmerking: HHI er rokna fyri hvønn einstaka aktør í "aðrir" serskilt. Somuleiðis skal viðmerkjast at Auto Service var yvirtikið í november 2023 av Waag bilum og tí hevur Auto Service ein marknaðarpart í 2023, meðan EX-post útrokningin er ætlað at vísa væntaðu marknaðarstøðuna eftir yvirtøkuna og tá er Auto Service partur av Waag bilum. Fyri at hava eitt delta, ið er broytingin í HHI, sum vísir røttu myndina, er delta roknað frá tí ex-ante støðu tá Auto Service var vorðin partur av Waag bilum, men áðrenn yvirtøkuna hjá Wenzel av Komfortbilum. Ex-ante HHI var 2040,8

175. Av talvuni framgongur, at Wenzel var næststørsta bilasølan mált í mun til innflutning av persónbilum, og at tríggjar tær størstu bilasølurnar fara at standa fyri [70-80]% av samlaða innflutninginum av nýggjum bilum. Miðsavningin sum kemur av hesi yvirtøku er avmarkað, men fer fram á einum marknaði sum ár fyri ár er vorðin alt meira miðsavnaður. Nevnast kann at í 2019 stóðu tríggjar av størstu fyritøkunum fyri [50-60]% av samlaða innflutninginum.

176. Í ES vegleiðingini um vatnrættar samanleggingar verður sagt, at marknaðarpartar, sum ikki fara upp um 25%, vanliga ikki geva høvi til kappingarlig ivamál.[37] Tó skal viðmerkjast, at eins og vegleiðingin sjálv vísur á, so eru marknaðarpartar bert ein innleiðandi ábending um, hvørt kappingarlig ivamál eru. Ein nærri kanning av marknaðarumstøðunum, støðuni hjá luttakandi fyritøkunum og støðuni hjá kappingarneytum má altíð kannast.

[37] ES vegleiðing um vatnrættar samanleggingar, reglubrot 18

177. Herfindahl indeksið fyri søluni av nýggjum bilum fer úr 2040,8 til 2142,8, sum er ein broyting á 102,0. Í hesum sambandi skal vísast á, at ES Kommissiónin í síni vegleiðing um vatnrættar samanleggingar skrivar fylgjandi í reglubroti 20:

> "Det er også usandsynligt, at Kommissionen vil påvise horisontale konkurrencemæssige problemer ved et HHI efter fusionen på mellem 1.000 og 2.000 og et delta under 250, eller et HHI efter fusionen på over 2.000 og et delta under 150, medmindre der foreligger særlige omstændigheder, som for eksempel hvis en eller flere af følgende faktorer gør sig gældende:..."

178. Sostatt er miðsavningin omanfyri 2.000, men broytingin er undir 150. Við øðrum orðum vil sjálv broytingin, sum yvirtøkan hevur við sær, vanliga ikki skapa ivamál um, at kappingin verður tarnað á marknaðinum fyri nýggjar persónbilar. Tað merkir tó ikki, at tað ikki kunnu verða onnur viðurskifti, sum føra til eina aðra niðurstøðu.

179. Tað eru fleiri viðurskifti sum tala fyri, at yvirtøkan kann skapa kappingarlig ivamál, hóast marknaðarparturin hjá P/f Wenzel, á marknaðinum fyri sølu av nýggjum bilum, ikki fer uppum 25% eftir yvirtøkuna. Í fyrsta lagi er talið av fyritøkum og tað at talið av fyritøkum, ið eru farnar úr marknaðinum seinastu árini órógvandi. Í sambandi við samanleggingarmál er vanligt, at hugt verður eftir talinum av kappingarneytum, og styrki teirra, eftir at samanleggingin er gjøgnumført. Í øðrum lagi er yvirtakandi fyritøkan næst størst á marknaðinum. Tað hevur somuleiðis týdning at hyggja at, hvør strategiska støðan hjá luttakandi fyritøkunum er á marknaðinum. Í hesum føri er talan um at næststørsta fyritøkan styrkir um sína støðu á marknaðinum. Í triðja lagi verður marknaðarstøðan eftir yvirtøkuna tann, at tríggjar av størstu bilasølunum fara at ráða yvir [70-80]% av marknaðinum. Tá talan er um oligopolistiskan marknað við so høgari miðsavning, er vandi altíð fyri samskipan millum teir stóru á marknaðinum. Í fjórða lagi er privati innflutningurin av bilum sera avmarkaður. Hetta merkir, at kappingarliga trýstið uttanfyri landafrøðiliga marknaðin er rættuliga avmarkað. Í fimta lagi vóru yvirtakandi felagið, P/f Wenzel, og target, Sp/f Komfortbilar, nærmastu kappingarneytar innan ávis kundasegmetir.

180. Omanfyrinevndu viðurskifti skulu setast í mun til tað faktum, at yvirtøkan bert førir til ein marknaðarlut á <25% og broytingin er í mun til miðsavning er undir tað, sum vanliga vildi verið mett at skapa kappingarlig ivamál.

4.2.1.2. Viðkomandi marknaðurin fyri sølu av premium merkja persónbilum

181. Í sambandi við skilmarking av viðkomandi marknaði, undir parti 4.1.1. Marknaðurin fyri sølu av nýggjum bilum, var tað metingin hjá Kappingareftirlitinum, at viðkomandi vørumarknaður var søla av nýggjum premium merkja bilum.

182. Hetta kemur av, at tað serliga er BMW sum yvirtøkan snýr seg um, og søla, viðlíkahald og umvælingar av BMW hava verið høvuðsvirksemið hjá Sp/f Komfortbilum øll árini, undantikið í 2024.

183. Í talvuni niðanfyri sæst marknaðarparturin hjá hvørjari einstakari bilasølu í tíðarskeiðinum 2019 til 2023 grundað á nøgdina av innfluttum premium bilum. Somuleiðis er ex-post marknaðarparturin roknaður fyri støðuna har yvirtøkan er framd.

Talva 4.2.1.2A: Marknaðarpartar og HHI fyri árini 2019 til 2023 og ex-post marknaðarpartar og HHI$^{ex\text{-}post}$ fyri premium-merkja bilar

Innflutningur av nýggjum persónbilum	2019	2020	2021	2022	2023	Ex-post
Wenzel	[40-50]%	[30-40]%	[30-40]%	[30-40]%	[30-40]%	[40-50]%
Komfortbilar	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%	0%
Reyni Service	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%
Bilasølan	[10-20]%	[10-20]%	[20-30]%	[10-20]%	[5-10]%	[5-10]%
Waag	[30-40]%	[30-40]%	[20-30]%	[20-30]%	[20-30]%	[20-30]%
Berg Motors	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%
Norðbil	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%
Autoservice	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	0%
Aðrir	[0-5]%	[0-5]%	[5-10]%	[5-10]%	[10-20]%	[10-20]%
HHI	**3217,3**	**2939,4**	**2605,3**	**2388,5**	**2572,5**	**3213**

Kelda: Akstovan, egnar útrokningar hjá Kappingareftirlitinum
Viðmerking: HHI er rokna fyri hvønn einstaka aktør í "aðrir" serskilt

184. Útrokningarnar omanfyri vísa at P/f Wenzel er størsta fyritøka á marknaðinum fyri sølu av premium-merkja bilum um mált er eftir talinum av innfluttum bilum. P/f Wenzel hevur havt ein marknaðarpart, sum í miðal hevur ligið um [30-40]%, og ex-post marknaðarparturin er [40-50]%. Verður yvirtøkan góðkend koma 3 av størstu fyritøkunum at ráða yvir [80-90]% av útboðnum.

185. Sum umrøtt í reglubroti 156, verður í vegleiðing hjá ES kommissiónini um vatnrættar samanleggingar nevnt, at marknaðarpartar omanfyri 50% kunnu í sjálvum sær verða prógv um, at talan er um eina ráðandi støðu. Í vegleiðingini hjá ES Kommissiónini verður víst á, at ein samanlegging, sum førir við sær, at samlaði marknaðarparturin liggur ímillum 40% og 50%, eisini kann skapa kappingarlig ivamál saman við øðrum viðurskiftum, so sum talið av verandi kappingarneytum og teirra marknaðarstyrki, kapasitets avmarkingar ella í hvønn mun vørurnar hjá samanløgdu pørtunum eru tættir substituttar.

186. Herfindahl-indeksið fyri sølu av nýggjum premium merkja persónbilum vísir, at marknaðurin er sera miðsavnaður. Sambært útrokningini í talvuni hækkar HHI frá 2.572,5 áðrenn yvirtøkuna til 3.213,0 eftir yvirtøkuna. Hetta svarar til eitt delta á 639,5.

187. HHI eftir yvirtøkuna liggur sostatt væl omanfyri 2.000, og delta er eisini munandi hægri enn 150, sum eru tey vegleiðandi mørkini í ES-vegleiðingini, har ein samanlegging vanliga krevur nærri kappingarliga meting. Úrslitið bendir tí á, at yvirtøkan ikki bert styrkir støðuna hjá P/f Wenzel á marknaðinum fyri premium merkja persónbilar, men eisini førir til eina týðiliga øking í miðsavningini á einum marknaði, sum frammanundan er nógv miðsavnaður.

188. Av tí at bæði marknaðarpartar og HHI-indeks geva ábendingar um, at yvirtøkan kann skapa kappingarlig ivamál, hevur Kappingareftirlitið valt at hyggja eftir diversion ratio, GUPPI, UPP og IPR.

189. Diversion ratio er amboð sum kann brúkast til at máta hvussu tættir kappingarneytar tvær fyritøkur eru. Diversion ratio gevur eina ábending um til hvønn kappingarneyta kundarnir hjá eini fyritøku væntandi fara, um fyritøkan hækkar sínar prísir, lækkar dygd ella trínur út av marknaðinum. Um

diversion ratio er høgt, so vilja fyritøkurnar í stóran mun avmarka hvørja aðrar í mun til prísseting og atburð á marknaðinum.

Diversion ratio: $D_{12} = \frac{\delta Q_2/\delta p_1}{\delta Q_1/\delta p_2} = -\frac{\varepsilon_{21}}{\varepsilon_1} * \frac{Q_2}{Q_1}$, $D_{21} = \frac{\delta Q_1/\delta p_2}{\delta Q_2/\delta p_1} = -\frac{\varepsilon_{12}}{\varepsilon_2} * \frac{Q_1}{Q_2}$

190. Á talvuni niðanfyri er diversion ratio fyri Wenzel, Waagbilar, Bilasøluna og Reyni Service í mun til Komfortbilar fyri árini 2021 til 2023. Diversion ratio tekur støði í innflutninginum av merkja brand bilum hesi árini. Kappingareftirlitið metir, at tað er í lagi at brúka innflutningstøl í hesum føri, tí eingin intra-brand kapping er á marknaðinum og privati innflutningurin av brúktum bilum er nær um eingin.

Talva 4.2.1.2B: Diversion ratio í sambandi við sølu av premium-bilum

Diversion ratio frá Komfortbilar	2021	2022	2023	2021-2023
Wenzel	[40-50]%	[30-40]%	[40-50]%	[30-40]%
Bilasølan	[20-30]%	[10-20]%	[10-20]%	[10-20]%
Reyni Service	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%
Waag	[20-30]%	[30-40]%	[30-40]%	[20-30]%

Kelda: Akstovan, egnar útrokningar hjá Kappingareftirlitinum

191. Talvan omanfyri skal skiljast soleiðis, at fyri hvørjar 100 brúkarar, sum skifta frá BMW, vilja runt roknað [0-5] fara til Reyni Service og keypa Lexus, [10-20] fara niðan í Bilasøluna at keypa Audi, og [20-30] fara niðan til Waagbilar at keypa Mercedes-Benz, meðan [40-50] fara til Wenzel at keypa Volvo ella Polestar. Tann uppmerksami lesarin varnast kanska, at tølini fyri hvørt ár og miðaltalið fyri tíðarskeiði geva ikki 100% tilsamans. Hetta kemur av, at tað í tíðarskeiðinum hava verið innflytarar av nýggjum Tesla og øðrum premium-merkja bilum. Teir síðstu [10-20]% brúkararnir vilja tí antin innflyta sjálvir ella venda sær til onkran at innflyta nýggja premium merkja bil fyri seg.

192. Hetta merkir so eisini, at av øllum bilasølum í Føroyum, so loysir tað seg best hjá P/f Wenzel at yvirtaka BMW og hækka prísirnir á BMW eftir yvirtøkuna, tí felagið varðveitir flest kundar av øllum bilasølunum.

193. Kappingareftirlitið hevur valt at gera eina GUPPI-kanning, eina UPP-kanning og eina IPR-kanning fyri at meta um kappingarligu árinini av, at Wenzel ella aðrar bilasølur yvirtaka BMW-virksemi hjá Sp/f Komfortbilum.

194. Ein GUPPI-kanning, Gross Upward Pricing Pressure Index, er eitt búskaparligt amboð, sum verður brúkt í metingini av møguligum einsæris prísárinum í samanleggingum millum fyritøkur, sum selja ymiskar vørur, men sum kunnu varasetast fyri hvørja aðra. Testin vísir, hvussu stórt trýst samanleggingin skapar á prísin á einum ávísum produkti, tí søla, sum áðrenn samanleggingina hevði verið mist til hin partin, eftir samanleggingina verður varðveitt innan somu fyritøku. GUPPI-testin verður nýtt til at meta um, í hvønn mun tann yvirtakandi fyritøkan er eggjað til at hækka sínar prísir eftir samanleggingina.

195. GUPPI verður vanliga roknað við støði í diversion ratio frá produkti 1 til produkt 2, bruttomarginalinum á produkti 2 og lutfallinum millum prísin á produkti 2 og prísin á produkti 1. Ein høgur GUPPI gevur ábending um, at samanlagda fyritøkan fær sterkari búskaparliga eggjan til at hækka prísin, tí partur av mistu søluni verður endurvunnin innanhýsis. GUPPI mátar einans trýstið at hækka prísin frá eftirspurningssíðuni, og ikki hvussu nógv, ella um, prísurin verður hækkaður.

$$GUPPI_1 = \frac{D_{12}(p_2 - c_2)}{p_A}$$

196. Ein UPP-testur, Upward Pricing Pressure-testur, byggir á somu grundhugsan, men roynir at vísa nettotrýstið á prísin eftir samanleggingina. Testin samanber øðrumegin tað prísøkjandi árin, sum stendst av, at kappingartrýstið millum partarnar verður internaliserað, og hinumegin møgulig mótvegis árin, serliga økt virkni ella lægri marginalkostnaðir, sum kunnu toga í mótsattu ætt. UPP-testurin verður tí ofta nýttur sum eitt screeningsamboð til at meta, um samanleggingin kann geva samanløgdu fyritøkuni eggjan til at hækka prísirnar, áðrenn ein fullfíggjað marknaðargreining ella merger simulation verður gjørd.

$$UPP_1 = (p_2 - c_2)D_{12} - e_1 c_1$$

197. Ein IPR-testur, illustrative Price Rise-testur, byggir á tey tøl sum verða nýtt í GUPPI og UPP-kanningini til at meta um ta príshækking, sum ein sammanlegging førir við sær. Her má man gera nakrar fortreytir viðvíkjandi hvussu eftirspurningurin uppførir seg, og vanligast er at nýta linjurættan eftirspurning, har ein ávís prísbroyting í krónum leiðir til eina fasta broyting í eftirspurningsmongdini, ella isoelastiskan eftirspurning, har ein ávís prísbroyting í prosentum leiðir til eina fasta broyting í eftirspurninginum í prosentum.

$$IPR_1 = \frac{\Delta P_1}{P_1} = \frac{1}{2}\frac{D_{12}M_2\frac{P_2}{P_1} + D_{12}D_{21}M_1}{1 - D_{12}D_{21}}$$

198. GUPPI, UPP og IPR eru ikki sjálvstøðug prógv fyri, at prísir verða hækkaðir, men tey eru viðkomandi indikatorar, sum skulu tulkast saman við øðrum viðurskiftum, eitt nú marknaðarpartum, HHI, nærleika millum kappingarneytar, atgonguforðingum, keyparamakt og møguligum effektivitetum.

199. Á talvuni niðanfyri eru úrslitini frá GUPPI-kanning í mun til søluna av premium-bilum hjá Sp/f Komfortbilar um fyritøka X yvirtekur søluna av BMW.

Talva 4.2.1.2C: GUPPI- kanning fyri søluna av BMW skilt á møguligar yvirtøkur av BMW-søluni

GUPPI fyri yvirtøkuna av Komfortbilar	2021	2022	2023	2021-2023
Wenzel	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%
Bilasølan	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%
Reyni Service	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%
Waag	[0-5]%	[5-10]%	[5-10]%	[5-10]%

Kelda: Akstovan, egnar útrokningar hjá Kappingareftirlitinum

200. Greiningin omanfyri bendir á, at uttan mun til, um hugt verður ár fyri ár, ella miðal fyri árini 2021 til 2023, so er prístrýstið størst á premium bilum hjá P/f Wenzel, meðan tað er minst hjá P/f Reyni Service. Berg Motors og tær bilasølurnar, sum innflyta brúktar bilar, eru ikki við í útrokningini, men, um tær vóru tiknar við, so vildi GUPPI-talið verið 0%, tí tær selja ikki nýggjar premium-merkja bilar.

201. Miðal GUPPI-talið á [5-10]% fyri P/f Wenzel merkir, at yvirtøkan av BMW-virkseminum hjá Sp/f Komfortbilum í miðal skapar eitt príshækkingartrýst á [5-10]% á søluna hjá Wenzel av BMW. Talið skal skiljast soleiðis, at um Wenzel eftir yvirtøkuna hækkar prísin á BMW, so fer ein partur av teimum kundunum, sum velja BMW frá, framvegis at enda í sama felagi, tí BMW-virksemið nú er hjá Wenzel. Hendan innanhýsis endurvinningin av sølu minkar tapið við einari príshækking og gevur tí Wenzel eina størri búskaparliga eggjan til at hækka prísir ella minka avsláttur á BMW.

202. GUPPI-talið er tó ikki eitt beinleiðis prógv fyri, at prísirnir fara at hækka við [5-10]%. Talið vísir heldur, hvussu stórt prístrýst samanleggingin skapar, uttan at hædd verður tikin til onnur viðurskifti sum t.d. møguligt kappingarligt trýst frá øðrum kappingarneytum.

203. Eitt miðal GUPPI-tal á [5-10]% er kortini ein týðandi ábending um, at BMW undan yvirtøkuni hevur lagt eitt veruligt kappingartrýst á Volvo og Polestar hjá Wenzel, og at hetta trýstið við yvirtøkuni verður internalisera hjá P/f Wenzel.

204. Tað eru eingi lógarásett mørk fyri GUPPI, og ES-kommissión hevur hvørki í siðvenju ella í sínum vegleiðingum víst á nøkur mørk. GUPPI er tó brúkt í fleiri málum, men markvirðini verða ofta sett frá føri til føri. Tað er tó ofta nevnt sum eitt byrjunar útgangspunkt at GUPPI undir 5% er ein ábending um, at ein yvirtøka ikki førir til kappingarlig ivamál, meðan eitt GUPPI omanfyri 5% gevur ábending um at yvirtakandi fyritøkan verður eggjað til at at hækka prísin, meðan eitt GUPPI omanfyri 10% gevur ábending um, at fyritøkan hevur eina sterka eggjan til at hækka prísin.

205. Í talvuni niðanfyri eru úrslitini frá UPP-kanning í mun til søluna av premium-bilum hjá Sp/f Komfortbilar um fyritøka X yvirtekur søluna av BMW.

Talva 4.2.1.2D: UPP-kanning fyri søluna av BMW skilt á møguligar yvirtøkur av sølu av BMW

UPP fyri yvirtøkuna av Komfortbilar	2021	2022	2023	2021-2023
Wenzel	[35.000-70.000] Kr.	[35.000-70.000] Kr.	[35.000-70.000] Kr.	[35.000-70.000] Kr.
Bilasølan	[0-35.000] Kr.	[0-35.000] Kr.	[0-35.000] Kr.	[0-35.000] Kr.
Reyni Service	[0-35.000] Kr.	[0-35.000] Kr.	[0-35.000] Kr.	[0-35.000] Kr.
Waag	[0-35.000] Kr.	[35.000-70.000] Kr.	[35.000-70.000] Kr.	[35.000-70.000] Kr.

Kelda: Akstovan, egnar útrokningar hjá Kappingareftirlitinum

206. Talva 4.2.1.2B vísir úrslitið av UPP-kanningini fyri bilasølurnar Wenzel, Waagbilar, Bilasøluna og Reyni Service. Talvan skal skiljast soleiðis, at tølini fyri hvørja bilasølu siga nakað um hvussu stóra eggjan bilasølan hevði at hækka prísin á BMW, um ávísa bilasølan yvirtók BMW-virksemi hjá Sp/f Komfortbilum.

207. T.d. er miðal UPP-talið fyri Wenzel [35.000-70.000] kr., ið merkir, at Wenzel verður eggjað at hækka prísin á einum bili, ið kostar 700.000 kr. Við upp til [35.000-70.000] kr. Hetta kemst av, at kundar, sum í sambandi við eina príshækking á BMW kundu skift til Volvo ella Polestar eftir yvirtøkuna, verða varðveittir í Wenzel, hóast teir skifta. Talan er ikki um eina staðfesta príshækking, men alt annað líka metir UPP-kanningin, hvussu stórt prísstrýst yvirtøkan vil føra við sær.

208. Í talvuni niðanfyri eru úrslitini frá IPR-kanning í mun til søluna av premium-bilum hjá Sp/f Komfortbilar um fyritøka X yvirtekur søluna av BMW.

Talva 4.2.1.2E: IPR- kanning fyri søluna av BMW skilt á møguligar yvirtøkur av søluni av BMW

IPR við yvirtøkuna av Komfortbilar	2021	2022	2023	2021-2023
Wenzel	[0-5]%	[0-5]%	[5-10]%	[0-5]%
Bilasølan	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%
Reyni Service	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%
Waag	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%	[0-5]%

Kelda: Akstovan, egnar útrokningar hjá Kappingareftirlitinum

209. Talvan omanfyri vísir úrslitið av IPR kanningini á møguligar yvirtakarar av søluni av BMW. Her er tað ein meting, bygt á fortreytina at eftirspurningurin er linjurættur, og sigur hetta hvat ein meting av príshækkingini av BMW-bilum vil verða um hesar fyritøkur yvirtaka søluna.

210. Her sæst at væntaða príshækkingin hjá P/f Wenzel liggur um [0-5]%-[5-10]% og miðaltalið er [0-5]%, sum merkir, at um P/f Wenzel selur ein bil, sum Sp/f Komfortbilar vanliga seldi fyri 700.000 kr., so kann P/f Wenzel selja sama bil fyri umleið [700.000-735.000] Kr., alt annað líka. Hetta er aftur tí, at eggjanin hjá kundum at keypa aðrar bilar, í stóran mun leiðir kundan aftur til P/f Wenzel, tí at P/f Wenzel ræður av einum stórum parti av premium marknaðinum frammanundan.

211. Útrokningarnar av Diversion ratio, GUPPI, UPP og IPR vísa, at ein møgulig yvirtøka hjá Wenzel av BMW-virkseminum hjá Komfortbilum er mest óhepna støðan fyri virknu kappingina á marknaðinum fyri sølu av nýggjum premium-bilum.

212. Hóast Kappingareftirlitið ikki tekur undir við, at sølan av leigubilum skal takast úr útrokningunum, hevur Kappingareftirlitið allíkavæl tikið leigubilarnar úr dátugrundarlagnum. Í fylgiskjal 1 síggjast útrokningarnar har leigubilar ikki eru tiknir úr dátugrundarlagnum. Kappingareftirlitið metir, at niðurstøðan er hin sama um hesi tøl vóru nýtt.

4.2.1.3. Viðkomandi marknaðurin fyri sølu av brúktum persónbilum

213. Føroysku bilasølurnar, bæði tær sum hava umboð og tær sum ikki hava umboð, eru virknar á marknaðinum fyri sølu av brúktum bilum. Tað fer eisini nógv søla fram millum privat av brúktum bilum, men er hendan ikki partur av viðkomandi marknaði.

214. Kappingareftirlitið hevur fingið upplýst, at umframt at selja nýggjar bilar hava og brúktar bilar sum eru komnir inn í sambandi við bilkeyp, so innflyta føroyskar bilasølur eisini brúktar bilar. Bæði Wenzel og Komfortbilar hava innflutt brúktar bilar til at selja.

215. Niðanfyri sæst gongdin í innflutninginum av brúktum bilum seinastu 5 árini og býti millum bilmerkini.

Mynd 4.2.1.3A: Gongdin í innflutningi av brúktum bilum og býti millum bilmerkini



Kelda: Akstovan

216. Kappingareftirlitið skal vísa á, at innflutningurin av brúktum bilum er lutfalsliga lítil sammett við innflutningin av nýggjum bilum. Tað framgongur av sirkul myndini til høgru, at tey mest vælumtóktu merkini eru VW, BMW, Audi, Mercedes-Benz og Volvo. Lutfallið millum premium-merkja bilar og mass-market bilar er 53% og 47%, og lutfallið millum lívrunnið brennievni øðrumegin og El og Hybrid hinumegin er helvt um helvt.

217. Kappingareftirlitið hevur innsavnað tøl fyri søluna av brúktum bilum hjá føroysku bilasølunum fyri 2025. Tað er í hesum sambandi ein avbjóðing, at Sp/f Komfortbilar fór undir trotabúsviðgerð tann 24/11-2025, og tískil hevur tað verið ein avbjóðing hjá Kappingareftirlitinum at fáa útgreinaði tøl fyri virksemið hjá Komfortbilum.

Talva 4.2.1.3A: Marknaðarpartar fyri sølu av brúktum bilum í 2025

Felag	Marknaðarpartur
Reyni Service	[20-30]%
Waag	[20-30]%
Bilasølan	[10-20]%
Berg Motors	[0-5]%
Wenzel	[20-30]%
Aðrir	[10-20]%

218. Sambært talvuni omanfyri, so er eisini brúktbilasølan býtt millum tær fýra stóru bilasølurnar, og tað er ikki undranarvert, havandi í huga, at ofta kemur bilur í býti í sambandi við sølu av nýggjum bili, samstundis sum nakrar av bilasølunum eru eisini farnar at innflyta brúktar bilar.

219. Bólkurin "Aðrir" fevnir millum annað um tær bilasølurnar, sum einki umboð hava, og hvørs virksemi fevnir um innflutning av lítið brúktum bilum.

220. Kappingareftirlitið metir ikki, at yvirtøkan av virkseminum hjá Komfortbilum skapar nøkur ivamál á hesum viðkomandi marknaði, tí góð atgongd tykist til at verða til henda marknað. Fleiri fyritøkur eru komnar inn á marknaðin seinastu árini, og hinvegin eru nakrar farnar av marknaðinum aftur. Hetta gevur eina ábending um, at kappingin á hesum viðkomandi marknaði er virkin.

4.2.1.4. Viðkomandi marknaðurin fyri verkstaðstænastur

221. Marknaðurin fyri bilverkstaðstænastur fevnir um verkstøð hjá umboðsbilasølunum og sjálvstøðug verkstøð. Tænasturnar fevna m.a. um vanligt viðlíkahald, mekaniskar umvælingar, feilsøking, skaðaumvælingar, garantiarbeiði, software-dagføringar og sølu og nýtslu av eykalutum.

222. Í kappingarligu metingini hevur tað týdning at skilja millum vanligar verkstaðstænastur, sum í størri mun kunnu veitast av fleiri óheftum verkstøðum, og autoriseraðar tænastur, har atgongd til serlig diagnosutól, software, originalar eykalutir, útbúgvin starvsfólk og góðkenning frá bilmerkinum kann hava avgerandi týdning.

223. Fyri eldri bilar uttan garanti, kunnu kundar í størri mun velja millum ymisk verkstøð, og óheft verkstøð kunnu í hesum førum leggja eitt ávíst kappingartrýst á verkstøðini hjá bilasølunum. Fyri nýggjari bilar, bilar undir garanti og bilar, har skjalprógvað tænastusøga hevur týdning fyri virðið á bilinum, er kappingartrýstið frá óheftum verkstøðum tó meira avmarkað. Í slíkum førum kann kundin hava ein serligan áhuga í at nýta eitt autoriserað verkstað, serliga tá talan er um garantiarbeiði, software, elektroniska feilsøking, trygdarskipanir og arbeiði, sum krevur beinleiðis atgongd til serliga vitan um merki ella ella atgongd til originalar eykalutir.

224. Yvirtøkan hevur serligan týdning fyri verkstaðartænastur til BMW. P/f Wenzel hevur, umframt at yvirtaka debitorar, eykalutir og útgerð til BMW, sett starvsfólk frá Komfortbilum og hevur fingið góðkenning sum BMW-service verkstað. Hetta merkir, at yvirtøkan ikki bert fevnir um fysiskar ognir, men eisini um førleikar, kundasambond og atgongd til at veita eftirmarknaðartænastur til BMW. Komfortbilar var framdmanundan tann aktørurin, sum var knýttur at BMW-tænastum í Føroyum, og við yvirtøkuni verður hetta sjálvstøðuga kappingartrýstið tikið av marknaðinum.

225. Kappingareftirlitið metir, at P/f Wenzel við yvirtøkuni fær eina styrkta støðu á eftirmarknaðinum. Felagið hevur frammanundan fleiri bilmerkir, verkstað, eykalutagoymslu og ein stóran kundaskarða. Tá BMW-tænastur verða lagdar afturat hesum virksemi, fær Wenzel eitt breiðari úrval og betri møguleika at knýta kundar at sær gjøgnum sølu, fígging, garanti, viðlíkahald, eykalutir og eisini umvælingar og viðlíkahald uttan fyri garanti. Hetta kann minka skiftimøguleikarnar hjá kundum og gera tað torførari hjá øðrum verkstøðum at skapa eitt veruligt alternativ til P/f Wenzel.

226. Atgonguforðingarnar eru harumframt hægri fyri autoriseraðar verkstaðstænastur enn fyri vanligt verkstaðsvirksemi. Eitt verkstað kann í prinsippinum byrja við avmarkaðari íløgu, men at veita fullgóða BMW-tænastu krevur serligan merkjakunnleika, diagnosutól, software-atgongd, útbúgvin starvsfólk, atgongd til eykalutir og ofta eina avtalu ella góðkenning frá merkinum ella viðkomandi innflytara. Hetta ger, at onnur verkstøð ikki skjótt og uttan víðari kunnu taka yvir tað kappingartrýst, sum Komfortbilar áður legði á marknaðin.

227. Hetta hevur týdning fyri SIEC-metingina. Hóast marknaðurin fyri verkstaðstænastur kann vera breiðari enn einans BMW-tænastur, kann yvirtøkan kortini hava skaðilig kappingarárin, um hon

tekur burtur eitt týðandi sjálvstøðugt kappingartrýst í einum undirsegmenti, har kundarnir hava avmarkaðar skiftimøguleikar. Serliga fyri nýggjari BMW-bilar, bilar undir garanti og bilar, har tænastusøga og góðkenning hava týdning, kann Wenzel eftir yvirtøkuna fáa størri møguleika at ávirka prísir, bíðitíðir, tænastutreytir og kundabinding.

228. Kappingareftirlitið metir tí, at yvirtøkan kann styrkja støðuna hjá P/f Wenzel á marknaðinum fyri verkstaðstænastur í Føroyum, serliga tá tað kemur til service undir garanti. Við yvirtøkuni verður eitt sjálvstøðugt BMW-service verkstað hjá einum av minstu aktørunum á marknaðinum flutt til ein av størstu aktørunum á føroyska bilmarknaðinum, sum longu hevur garanti service til tvey onnur premium bilmerki.

4.2.2. Møgulig einsæris árin (Non-coordinated effects)

229. Reglubrot 24-38 í leiðreglunum hjá ES-Kommissiónini um vatnrættar samanleggingar lýsa serliga tey árin, sum kunnu standast av eini samanlegging uttan at talan er um samskipan millum fyritøkur. Høvuðsspurningurin er, um samanleggingin tekur burtur eitt týðandi kappingartrýst á ein ella fleiri av partunum og harvið gevur samanløgdu fyritøkuni størri møguleika at hækka prísir, minka úrval, skerja tænastustøði ella á annan hátt virka meira óheft av kappingarneytum og kundum.

4.2.2.1. Luttakandi fyritøkur hava stórar marknaðarpartar

230. Tann fyrsta ábendingin um, at einsæris árin kunnu standast av yvirtøkuni er, um fyritøkurnar hava stóran marknaðarpart og um marknaðarparturin økist munandi.[38] Hevur fyritøkan stóran marknaðarpart eru sannlíkindini fyri, at fyritøkan hevur marknaðarmakt, størri. Somuleiðis kann væntast at tess størri økingin av marknaðarpartinum er, tess meira sannlíkt er tað at ein yvirtøka vil føra til eina munandi økta marknaðarmakt. Tí tess størri økingin í kundaskaranum er, sum yvirtakandi fyritøkan kann áleggja eina príshækking, tess meira sannlíkt er tað at ein príshækking vil loysa seg hóast at kundar fella frá.[39]

231. Kappingareftirlitið hevur, í parti 4.2.1. Marknaðarpartar og , kanna marknaðarpartar og miðsavning áðrenn og eftir yvirtøkuna. Sum tað framgongur av partinum, so er P/f Wenzel størsta bilasølan í Føroyum og serliga á marknaðinum fyri sølu av premium merkja bilum, høvdu bæði P/f Wenzel og Sp/f Komfortbilar eina sterka støðu á marknaðinum.

232. Sterka støðan serliga innan sølu av premium-bilum, har kundarnir ikki eru líka prísviðkvæmir, og har framhaldandi felagið fer at sita á trimum premium-merkjum av seks á føroyska marknaðinum, er sannlíkt at marknaðarmegin hjá P/f Wenzel fer at økjast.

233. Sambært útrokningum í parti 4.2.1 fer HHI indeksið á marknaðinum inna sølu av premium-merkja bilum frá 2.573 áðrenn yvirtøkuna til 3.213 eftir yvirtøkuna. Hetta merkir, at talan frammanundan longu var um ein rættiliga miðsavnaðan marknað, har yvirtøkan førir við sær eina størri miðsavning, sum liggur væl uttan fyri øll tey mørk sum er í ES vegleiðingini um vatnrættar samanleggingar. Eitt HHI á 3.213 og delta á 640 sum eina ábending um at yvirtøkan hjá P/f Wenzel av virkisøkinum hjá Sp/f Komfortbilum kann munandi forða fyri virknari kapping (SIEC).

---

[38] ES vegleiðing um vatnrættar samanleggingar, reglubrot 27
[39] ES vegleiðing um vatnrættar samanleggingar, reglubrot 27

4.2.2.2. Luttakandi fyritøkurnar eru tættir kappingarneytar

234. Sambært ES-leiðreglunum hevur tað serligan týdning, um partarnir í eini samanlegging eru tættir kappingarneytar. Ein samanlegging kann hava skaðilig non-coordinated effects, um hon tekur burtur eitt beinleiðis kappingartrýst millum tvey produkt ella tvær fyritøkur, sum kundarnir síggja sum nærliggjandi alternativ. Tað er ikki avgerandi, um partarnir eru teir størstu aktørarnir á øllum marknaðinum; tað avgerandi er, um teir kappast tætt um ein týðandi kundabólk.

235. Í hesum máli er sambandið millum partarnar serliga týðandi innan premium-segmentið. P/f Wenzel umboðar m.a. Volvo og Polestar, meðan Komfortbilar var knýtt at BMW. Hesi merki eru ikki eins, men tey kunnu vera nærliggjandi alternativ hjá kundum, sum eftirspyrja premium-bilar og leggja dent á merki, dygd, trygd, útgerð, tænastusøgu og sosiala virðing. Ein kundi, sum umhugsar ein BMW, kann í størri mun væntast at umhugsa Volvo, Audi, Mercedes-Benz ella Lexus enn aðrar mass-market bilar, sum Citroën, Ford, Toyota og Nissan.

236. Kappingareftirlitið hevur kannað diversion ratio á marknaðinum fyri premium-bilar og kann staðfesta, at premium merkja bilarnir hjá P/f Wenzel eru tættastu substituttar til BMW, og tískil er talan um tættar kappingarneytar. Tað framgongur av reglubroti 190 til 191 at diversion ratio millum Komfortbilar og Wenzel er [30-40]%, sum merkir, at um prísurin á BMW hækkar, so vilja [30-40]% av teimum kundum sum flýggja fara til Wenzel.

237. Yvirtøkan hevur tí við sær, at Wenzel fær atgongd til enn eitt premium merki og eitt kundagrundarlag, sum frammanundan hevur lagt eitt kappingartrýst á P/f Wenzel. Hetta verður eisini stuðlað av UPP-kanningini, sum gevur ábending um, at ein stórur partur av kundunum, sum høvdu valt Wenzel frá, í sambandi við eini príshækking á Volvo, høvdu farið til BMW. Tá hetta trýstið fellur burtur eftir yvirtøkuna verður P/f Wenzel tað minni avmarkað í síni príssetan av Volvo og BMW.

4.2.2.3. Kundarnir hava avmarkaðar møguleikar at skifta veitara

238. ES-leiðreglurnar leggja dent á, hvørt kundarnir hava veruligar og nóg góðar møguleikar at skifta til aðrar veitarar, um samanlagda fyritøkan hækkar prísir ella versnar um tænastutreytirnar. Um kundarnir hava avmarkaðar skiftimøguleikar, er sannlíkari, at ein príshækking, verri kundatreytir, ella onnur versnan av treytum kann løna seg eftir samanleggingina.

239. Á føroyska bilmarknaðinum eru møguleikarnir at skifta veitara ávirkaðir av, at marknaðurin er lítil, og tí bert er ein umboðsbilasøla fyri hvørt bilmerki, og at bilasøla, garanti, eykalutir og verkstaðstænastur ofta hanga tætt saman. Føroyskir brúkarar hava møguleika at velja ímillum fleiri bilmerki, men hava vanliga ikki møguleika at velja millum fleiri umboðsbilasølur av sama bilmerki.

240. Verandi BMW og Volvo kundar hava somuleiðis avmarkaðan møguleika at skifta veitarar, um hesir framvegis ynskja at varðveita garanti. Hóast óheft verkstøð kunnu leggja ávíst trýst á marknaðin fyri eldri bilar, eru tey ikki altíð fullgóðir substituttar fyri autoriseraðar ella merki-kønar tænastur. Hetta styrkir sannlíkindini fyri, at Wenzel eftir yvirtøkuna kann virka meira óheft av kundum innan hesi segment.

241. Samanumtikið kann tí sigast, at kundar hava avmarkaðar møguleikar at skifta veitara, tí eingin intrabrand kapping er. Eitt skifti frá einum veitara til ein annan merkir altíð at skift verður til annað bilmerki. Í sambandi við umvælingar og viðlíkahald er eisini avmarkað intrabrand kapping, tá tað

kemur til garanti umvælingar og service, meðan møguleikarnir at skifta veitara í sambandi við umvælingar og viðlíkahald av eldri bilum er lættari.

4.2.2.4. Kappingarneytar vilja sannlíkt ikki økja sítt útboð um prísirnir hækka

242. Eftir ES-leiðreglunum kann tað minka vandan fyri skaðiligum árinum, um kappingarneytar sannlíkt, skjótt, og í nóg stóran mun kunnu økja sítt útboð, um samanlagda fyritøkan hækkar prísirnar. Um kappingarneytarnir ikki hava slíkan møguleika, kann samanleggingin hinvegin geva samanløgdu fyritøkuni størri marknaðarvald.

243. Kappingareftirlitið metir, at tá kappingarneytar sannlíkt og skjótt kunnu økja sítt útboð um P/f Wenzel hækkar prísin, men av tí at talan er um premium bilmerki, so er talan um eina minni prísviðkvæma vøru, enn um talan var um mass-market bilmerki.

244. Ein onnur avbjóðing er, at P/f Wenzel eftir yvirtøkuna selur 3 av 6 premium merkjunum á føroyska marknaðinum, so møguleikarnir at skifta millum premium-merkir eru avmarkaðir. Undir slíkum umstøðum er væl møguligt, at kappingarneytarnir heldur velja eina príshækking, fram um hægri útboð.

245. At fáa umboð sum bilasøla ella verkstað, og harvið fáa atgongd til eitt premium-merki, krevur samráðingar við framleiðara ella innflytara, íløgur, høli, starvsfólk, verkstað, eykalutir, diagnosutól og kundaatlit. Hetta kann ikki væntast at henda skjótt á einum lítlum føroyskum marknaði.

246. Tað sama ger seg galdandi fyri verkstaðstænastur. Vanlig verkstøð kunnu í ávísan mun taka fleiri kundar inn, men tað er ikki tað sama sum at kunna veita fullgóða BMW-service við teimum krøvum, sum fylgja við garantiarbeiði, software, BMW-skannarum og originalum eykalutum. Kappingartrýstið frá øðrum aktørum kann tí ikki væntast at uppviga at Sp/f Wenzel steðgar sum sjálvstøðugt BMW-verkstað og bilasøla.

4.2.2.5. Samanlagda fyritøkan er før fyri at forða kappingarneytum at víðka

247. ES-leiðreglurnar vísa eisini á, at ein samanlegging kann hava skaðilig árin, um samanlagda fyritøkan fær størri møguleika at forða ella avmarka kappingarneytum í at víðka sítt virksemi. Hetta kann t.d. henda, um fyritøkan fær ræði á týdningarmiklum kundasambondum, tænastum, eykalutum, starvsfólkum, kapasiteti ella øðrum input, sum hava týdning fyri kappingina.

248. Kappingareftirlitið metir ikki at yvirtøkan forðar kappingarneytum í at víðka sítt virksemi, annað enn, at tað eru fyritøkur í vinnugreinini, ið ikki hava nakað premium-merki, ella hava eitt í Føroyum minni kent premium-merki. Hesir vilja í ávísan mun hava eina størri avbjóðing við at fáa fótafesti á premium marknaðinum, tí tey premium-merki sum føroyingar kenna til longu verða seld aðrastaðni. At innføra t.d. eitt kinverskt premium-merki á føroyska marknaðin er ein munandi størri avbjóðing enn eitt bilmerki, sum føroyingar longu hava kunnleika til.

4.2.2.6. Yvirtøkan tekur burtur eitt týðandi kappingartrýst

249. Sambært ES-leiðreglunum kann ein samanlegging hava skaðilig non-coordinated effects, um hon tekur burtur eina fyritøku, sum hevur verið ein týðandi kappingarligur faktor, hóast fyritøkan ikki neyðturviliga hevur havt størsta marknaðarpartin. Ein slík fyritøka kann hava týdning, tí hon hevur eitt sterkt merki, serligan kundagrunn, serligt kappingartrýst, innovativa ella príssetandi atferð, ella tí hon hevur havt potentiali at vaksa ella verða yvirtikin av einum øðrum aktøri.

250. Sp/f Komfortbilar hevði eina serliga støðu, tí fyritøkan, hóast hon var lítil og ikki væl umboða á mass-market segmentinum, sæt á einum av sterkastu premium bilmerkjunum. Hóast felagið var komið í fíggjarligar trupulleikar, hevði virksemið framvegis kappingarligt virði. Tað avgerandi er ikki bert, um Komfortbilar kundi hildið fram óbroytt, men eisini um BMW-tengdu virkiseindirnar kundu verið yvirtiknar av øðrum aktøri og harvið varðveitt eitt sjálvstøðugt kappingartrýst á Wenzel.

251. Við yvirtøkuni verður hetta kappingartrýstið savnað hjá Wenzel, sum kemur at selja trý premium merkir. Hetta minkar trýstið á Wenzel í premium-segmentinum, bæði tá tað kemur til sølu av nýggjum bilum og umvælingar og viðlíkahald. Kappingareftirlitið metir tí, at samanleggingin tekur burtur eitt týðandi kappingartrýst og kann hava skaðilig non-coordinated effects sambært reglubrotum 24-38 í ES-leiðreglunum.

4.2.3. Møgulig árin av samskipan

252. Samanleggingin økir eisini vandan fyri samskipaðum árinum. Ein marknaður við fáum veitarum, fleiri merkjum hjá hvørjum veitara, ongari intrabrand-kapping og lutfalsliga gjøgnumskygdum marknaðarviðurskiftum gevur betri møguleika fyri tigandi samskipan.

4.2.3.1. Møguleikin fyri semju um luttøkutreytir fyri samskipan

253. Sambært ES-leiðreglunum kunnu samskipað árin serliga koma fyri, tá marknaðarbygnaðurin ger tað møguligt, búskaparliga skilagott og varandi at tillaga atburðin hvør eftir øðrum, soleiðis at fyritøkur kunnu halda prísir omanfyri kappingarligt støði antin við beinleiðis samskipan ella umvegis tigandi samskipan. Ein samanlegging kann í einum miðsavnaðnum marknaði gera samskipan lættari, meira støðuga ella meira virkna, serliga um talið av sjálvstøðugum veitarum minkar.

254. Føroyski bilmarknaðurin fyri nýggjar bilar er eykendur við fáum veitarum og har einstøku bilasølurnar umboða fleiri merkir. Hetta avmarkar bæði intra- og interbrand kappingina.

255. Hesi viðurskifti gera tað lættari hjá verandi bilasølum at fáa eina felags fatan av teimum kappingarligu viðurskiftunum, sum t.d. listaprís, avsláttir, treytir fyri innbýting, tænastupakkar, og verkstaðstænastur, eiga at verða. Í einum lítlum marknaði við fáum veitarum er tað samstundis lættari at síggja, um allar fyritøkur fylgjast, ella um tað er fyritøka sum víkir frá hinum. Fyritøkur vilja verða eggjaðar at víkja frá eini beinleiðis ella óbeinleiðis samskipan um hetta kann gerast í loyndum, men vil aftra seg um tær meta at teirra atferð kann avdúkast.

4.2.3.2. Møguleikin at hava eftirlit við samskipanini

256. Sambært ES-leiðreglunum er samskipan bert varandi, um fyritøkurnar í nóg stóran mun kunnu hava eftirlit við, um hinar fyritøkurnar fylgja teimum treytum, sum samskipanin byggir á. Marknaðurin má tí vera so gjøgnumskygdur, at frávik frá samskipaðum atburði kunnu staðfestast innan rímiliga tíð, eitt nú um ein fyritøka byrjar at geva størri avsláttir, bjóða betri innbýtistreytir, lækka prísir ella á annan hátt roynir at vinna kundar frá hinum.

257. Á føroyska bilmarknaðinum eru fleiri viðurskifti, sum kunnu økja gjøgnumskygnið fyri bilasølurnar. Marknaðurin er lítil, aktørarnir eru fáir, og bilasølurnar føra ofta søluátøk á Facebook og heimasíðum við einum minsta listaprísi.

4.2.3.3. Revsimøguleikar

258. Sambært ES-leiðreglunum krevur varandi samskipan eisini, at tað finnast trúverdir revsimøguleikar, um ein fyritøka víkir frá samskipaða atburðinum. Hetta merkir ikki neyðturviliga eina beinleiðis revsing, men at hinar fyritøkurnar kunnu svara aftur á ein hátt, sum ger tað minni lønandi at bróta frá felags atburðinum, til dømis við at lækka prísir, geva størri avsláttir, bjóða betri innbýtistreytir ella kappast meira ágangandi um kundar.

259. Í einum marknaði, har somu fáu bilasølurnar afturvendandi møtast innan fleiri bilsløg og tænastur, kunnu slíkir mótreaktiónsmøguleikar vera trúverdir. Um ein aktørur til dømis byrjar at vinna marknaðarpart við ágangandi avsláttrum á einum merki, kunnu hinir svara aftur við sølutiltøkum ella betri treytum á sambærligum merkjum. Av tí at fyritøkurnar eisini møtast á fleiri nærskyldum marknaðum, eitt nú sølu av nýggjum bilum, brúktum bilum, innbýti, fígging og verkstaðartænastum, kann mótreaktión eisini fara fram á øðrum pørtum av virkseminum enn júst har frávikið varð staðfest. Hetta kann styrkja trúvirðið í revsimøguleikunum og harvið gera samskipan meira støðuga.

4.2.3.4. Møguligar reaktiónir hjá øðrum fyritøkum

260. Sambært ES-leiðreglunum kann samskipan bert vera væleydnað, um reaktiónir frá fyritøkum uttan fyri samskipanina, møguligum nýggjum kappingarneytum og kundum ikki kunnu oyðileggja úrslitið av samskipanini. Um uttanveltaðir aktørar skjótt kunnu økja útboðið, koma inn á marknaðin ella vinna kundar við lægri prísum, verður samskipan minni sannlík. Sama er galdandi, um stórir kundar hava nóg sterka keyparamakt til at trýsta prísirnar niður ella fáa ein aktør at víkja frá samskipaðum atburði.

261. Kappingareftirlitið metir, at slík mótvegis reaktión ikki í nóg stóran mun kann útiloka vandan fyri samskipaðum árinum í hesum máli. Marknaðurin fyri nýggjar premium-bilar er lítil og miðsavnaður, og atgongdin til nýggj premium-umboð krevur avtalu við framleiðara ella innflytara, íløgur í sølu- og verkstaðarvirksemi, starvsfólk, eykalutir og kundatlit. Óheftir innflytarar og brúktbilasølur kunnu leggja ávíst kappingartrýst, men eru ikki í øllum førum fullgóðir substituttar fyri bilasølur við sølu- ella verkstaðsumboði, ið kunnu veita service undir garanti, innbýti, fígging og eftirfylgjandi tænastu. Kundarnir eru harumframt í stóran mun privatkundar og smærri vinnukundar, sum hvør sær hava avmarkaða keyparamakt. Hetta bendir á, at reaktiónir frá øðrum fyritøkum og kundum ikki eru nóg sterkar til at mótvirka, at yvirtøkan kann gera samskipan lættari, meira støðuga ella meira virkna.

4.2.4. Yvirtøka av møguligum kappingarneyta

262. Talan er í hesum føri ikki um yvirtøku av einum møguligum kappingarneyta. Málið snýr seg um yvirtøku av ognum hjá einum kappingarneyta.

4.2.5. Hvørt samanleggingin skapar ella styrkir keyparamegi á einum ovara marknað

263. Samanleggingin kann eisini hava árin á innkeyps- og veitarasíðuna. Ein størri og breiðari bilasøla við fleiri merkjum kann fáa styrkta samráðingarstøðu mótvegis veitarum av bilum, eykalutum, útgerð og fígging. Hetta kann vera kappingarliga neutralt ella positivt, um fyrimunirnir koma kundum til góðar, men kann eisini styrkja eina støðu, sum ger tað torførari hjá smærri aktørum at kappast ella fáa atgongd til líknandi treytir.

264. Kappingareftirlitið metir, at hetta ikki eri ein ítøkiligur trupulleiki í sambandi við hesa yvirtøku.

4.2.6. Keyparamakt á viðkomandi marknað

265. Keyparamakt tykist ikki at vera eitt sterkt mótvektartrýst í hesum máli. Kundarnir eru í stóran mun privatkundar og smærri vinnukundar, sum hvør sær hava avmarkaða samráðingarstyrki. Hóast einstakir vinnukundar kunnu hava fleiri bilar, er ikki upplýst, at teir kunnu hótta við at flyta stórar nøgdir til nýggjan veitara ella stuðla nýggjari innkomu á marknaðin. Serliga fyri nýggjar bilar, garanti og autoriseraða tænastu kunnu skiftimøguleikarnir vera avmarkaðir.

266. Kappingareftirlitið metir tí, at eingin keyparamakt er av týdningi á viðkomandi marknaðum.

4.2.7. Atgongd til marknaðin

267. Atgongdin til marknaðin skal metast eftir, um innkoma er sannlík, tíðarhóskandi og nóg stór til at mótvirka kappingarligum skaða. Tað kann vera lætt at byrja eitt vanligt verkstað, men tað er ikki tað sama sum at koma inn sum fullur bilasølu- og tænastuveitari við merkjaumboðum, garanti, eykalutagoymslu, royndum starvsfólkum, kundagrunni og umdømi. Serliga á einum lítlum føroyskum marknaði kunnu stødd, merkiatgongd og kundatlit vera týðandi atgonguforðingar.

268. Afturat her skal viðmerkjast, at verðandi føroyskar bilasølur umboða í løtuni 28 bilmerki, harav áleið 22 eru millum mest vælkendu bilmerkini við uppruna í londum, sum Frankaríki, Týsklandi, Italia, Japan og USA.

269. Tað at øll ella flestu vælkendu bilmerki í Føroyum longu liggja á verðandi bilasølu ger tað torførari hjá nýggjum fyritøkum at byrja bilasølu í Føroyum, tí umframt at ein nýggj fyritøka vil verða fremmand fyri brúkarum, so vil fyritøkan koma við eini vøru, sum kundin ikki kennir frammanundan.

270. Kappingareftirlitið metir tí, at flestu bilmerki, ið eru vælkend í Føroyum, longu eru hjá føroyskum bilasølum, er við til at hindra atgongdina til føroyskar bilasølumarknaðir.

4.2.8. Virkni

271. Tað er upp til fráboðandi fyritøkuna at vísa á virkisfyrimunir og kravið til hesar er, at fyrimunirnir skulu verða knýttir til sjálva yvirtøkuna, kunna staðfestast og koma brúkarum til góðar.

272. Kappingareftirlitið metir, at fráboðari ikki í fráboðanini hevur víst á fyrimunir sum yvirhalda treytirnar omanfyri. Tað at útgerðin kann takast í nýtslu skjótari ella at keypi upp á aðrar mátar er praktiskt fyri P/f Wenzel at yvirtaka brúktu lutirnir hjá Sp/f Komfortbilum er ikki nóg mikið. Í mun til brúkaran skal hyggjast eftir, um hesin er betri stillaður eftir yvirtøkuna, enn áðrenn. Hetta hevur fráboðari ikki víst á. Tað at fyrimunirnir skulu kunna staðfestast, merkir sum meginregla, at hesir skulu kunna gerast upp ella í øllum førum skal metast um teir. Hetta er ikki gjørt í fráboðanini.

4.2.9. Failing firm

273. P/f Wenzel heldur uppá, at teir hava gjørt failing firm-verjuna galdandi. Kappingareftirlitið er tekur ikki undir við hesum uppáhaldi. Ein failing-firm-verja snýr seg um, at versnaða støðan á kappingini eftir yvirtøkuna ikki kann tilroknast yvirtøkuni í sjálvum sær, skilt á tann hátt, at kappingin á marknaðinum hevði verið skaðað í minst líka stóran mun, um yvirtøkan ikki var framd. Í sambandi við eina failing-firm-verju hyggur Kappingareftirlitið at trimum viðurskiftum:

a) Failing-firm fyritøkan hevði verið tvungin av marknaðinum innan langa tíð, orsaka av fíggjarligum óføri, um hon ikki var yvirtikin av einari aðrari fyritøku.

b) Eingin annar keypari er av failing-firm, hvørs yvirtøka hevði verið minni skaðilig fyri kappingina, enn fráboðaða yvirtøkan.
c) Ognirnar hjá failing-firm vóru horvnar av marknaðinum, um yvirtøkan ikki var framd.

274. Í ítøkiliga málinum um yvirtøkuna hjá P/f Wenzel av ognunum hjá Sp/f Komfortbilar, er failing-firm-verja tó ikki viðkomandi, tí yvirtøkan var framd áðrenn hon varð fráboðað til Kappingareftirlitið, og uttan at tað í nøktandi mun var staðfest, hvørt aðrir keyparar vóru áhugaðir í ognunum hjá Sp/f Komfortbilar, ella ikki. Kappingareftirlitið skal viðmerkja, at tað er ábyrgdin hjá fráboðara at lata Kappingareftirlitinum allar upplýsingar sum eru neyðugar fyri at skjalprógva og staðfesta eina failing-firm-verju.

275. Vísandi til omanfyristandandi metir Kappingareftirlitið sostatt ikki, at P/f Wenzel hevur gjørt, ella hevur møguleika at gera, eina failing-firm verju galdandi. Málið verður tí mett eftir vanliga SIEC-støðinum í § 15, stk. 2, í kappingarlógini.

4.2.10. Um samanleggingin ikki var framd

276. Í metingini av, um samanleggingin munandi forðar fyri virknari kapping, skal Kappingareftirlitið samanbera kappingarstøðuna eftir yvirtøkuna við ta støðu, sum sannlíkt hevði verið, um yvirtøkan ikki varð framd (Tann kontrafaktiska støðan). Spurningurin er tí ikki bert, um Sp/f Komfortbilar var í fíggjarligum trupulleikum, men hvat sannlíkt hevði hent við teimum ognum, starvsfólkum, kundasambondum, eykalutum, avtalum við BMW og BMW umboð, sum vóru knýtt at virkseminum, um P/f Wenzel ikki hevði yvirtikið tey.

277. Kappingareftirlitið hevur skjalprógv fyri, at tað vóru aðrar bilasølur sum vóru áhugaðar og tí høvdu ognirnar og kundagrundarlagið hjá Sp/f Komfortbilum ikki hvørvi úr marknaðinum. Tvørturímóti hevði tað verið møguligt at aðrir aktørar, partvís aðrar umboðsbilasølur ella aðrar bilasølur uttan umboð, kundi yvirtikið virksemi hjá Sp/f Komfortbilum.

278. Tað hevði antin ført til, at onnur bilasøla sum ikki stóð so sterkt á marknaðinum fyri premium-merkja bilar, ella ein fyritøka sum ikki hevði umboð, vildi yvirtikið virksemið. Hetta vildi verið minni skaðiligt fyri virknu kappingina á marknaðinum fyri nýggjar bilar og á marknaðinum fyri nýggjar premium-bilar.

4.3. Møgulig boð eftir §21 í kappingarlógini

279. Sambært § 21 í kappingarlógini kann Kappingarráðið, tá ein samanlegging er framd í stríð við reglurnar um samanleggingareftirlit, geva tey boð, sum eru neyðug fyri at endurreisa ella varðveita kappingarstøðuna. Ásetingin svarar til § 12 g í donsku kappingarlógini og gevur heimild til at áleggja pørtunum bæði atgerðir og avmarkingar, sum eru egnaðir til at beina burtur ella avmarka tey kappingarligu ivamál, sum standast av samanleggingini. Slík boð kunnu fevna um bæði bygnaðarlig og atferðarlig tiltøk, treytað av hvat er neyðugt og lutfalsligt í tí ítøkiliga málinum.

280. P/f Wenzel hevur gjøgnumført yvirtøkuna og heldur áfram við yvirtikna virkseminum hóast Kappingareftirlitið hevur gjørt vart við at yvirtøkan ikki kann fremjast fyrr enn hon er góðkend.

281. Kappingareftirlitið metir, at um Kappingarráðið tekur undir við tilmælinum um at sýta yvirtøkuna av virkseminum hjá Sp/f Komfortbilum, so er neyðugt við boðum sum kunna endurreisa marknaðarstøðuna sum hon var áðrenn yvirtøkuna.

282. Hetta kemur av at P/f Wenzel hevur gjøgnumført yvirtøkuna av ognunum hjá Sp/f Komfortbilum og hevur tryggja sær veiting av BMW-bilum frá donskum umboði og hevur fingið verkstaðsavtalu í lag við BMW Danmark, eins og Sp/f Komfortbilum hevði við BMW Danmark.

283. Afturat hesum metir Kappingareftirlitið at yvirtøkan fevnir um allar tríggjar transaktiónirnar sum eru gjørdar í sama tíðarskeiði. Tí er neyðugt at geva boð sum eisini fevna um hesar avtalur fyri at tryggja, at um onnur fyritøka yvirtekur ognirnar hjá Sp/f Komfortbilum, so kann hon eisini innganga tær avtalur sum eru neyðugar fyri at dríva BMW-virksemi í Føroyum.

284. Kappingareftirlitið metir tí, at fyri at endurreisa marknaðarstøðuna sum hon var undan yvirtøkuni er neyðugt at ógilda allar avtalur, sum eru gjørdar í sambandi við yvirtøkuna av virkseminum hjá Sp/f Komfortbilum.

5. Niðurstøða

285. Samanleggingin verður mett at munandi forða fyri virknari kapping. Marknaðurin er longu miðsavnaður, talið av veitarum er avmarkað, og føroysku bilasølurnar umboða yvir 20 av mest kendu bilmerkjunum. Hetta síðsta virkar sum atgonguforðingar til marknaðin. Inter-brand kappingin er avmarkað við at líknandi bilmerki eru hjá somu bilasølum og intrabrand-kappingin er ikki til staðar.

286. Meðan yvirtøkan ikki førir til marknaðarpartar ella HHI í sambandi við sølu av nýggjum bilum sum í sær sjálvum føra til kappingarlig ivamál, so eru onnur viðurskifti sum føra til kappingarlig ivamál eru. Hesir eru millum annað nevnd í reglubroti 179 og 253 - 261.

287. Innan sølu av premium merkja bilum førir yvirtøkan til marknaðarpartar og HHI sum geva høvi til kappingarlig ivamál. Yvirtøkan førir til marknaðarpartar og HHI sum liggja á einum støði sum skapa kappingarlig ivamál. Kappingareftirlitið hevur tí valt at roknað diversion ratio, GUPPI og UPP fyri premium merkja marknaðin og vísa hesar útrokningar, at yvirtøkan hjá P/f Wenzel føri millum annað til eitt prístrýst sum er omanfyri vanliga markið og at yvirtøkan hjá P/f Wenzel av virkseminum hjá Sp/f Komfortbilum er tann mest skaðiliga støðan fyri kappingina av teimum yvirtøku alternativum sum eru. Hesar greiningar eru at finna í reglubroti 188-211.

288. Yvirtøkan skapar sostatt bæði nøkur yvirskipað kappingarlig ivamál í mun til marknaðarbygnað og líkindi fyri samskipan í mun til sølu av nýggjum bilum, men eisini kappingarlig ivamál í mun til sølu av nýggjum premium bilum snúgva seg, útyvir tey yvirskipaðu kappingarligu ivamálini í mun til marknaðarbygnað og samskipan, eisini um einsæris árin á kappingina, sum geva høvi til kappingarlig ivamál.

289. Kappingareftirlitið metir tí, at yvirtøkan sannlíkt fer munandi at forða fyri virknari kapping og mælir tí til, at yvirtøkan verður sýtt, sbr. §15, stk. 2, 2 pkt. í kappingarlógini, ið sigur at ein yvirtøka sum munandi forðar fyri virknari kapping, serliga við at skapa ella styrkja eina ráðandi marknaðarstøðu, skal forbjóðast.

290. P/f Wenzel hevur longu gjøgnumført yvirtøkuna og hóast felagið er kunnað um sína fráboðanarskyldu longu í september 2025, umframt kunnað um at yvirtøkan ikki kundi fremjast, so heldur P/f Wenzel á við BMW-virkseminum. Hetta ger at ein sýting av yvirtøkuni er serliga

avbjóðandi tí, hetta ger tað torført hjá einum øðrum keypara at byrja virksemi á marknaðinum fyri sølu og viðlíkahald av BMW, tá nú P/f Wenzel hevur etablera seg.

291. Kappingareftirlitið sá tí onga aðra loysn enn, at mæla Kappingaráðnum til at geva boð eftir §21 í kappingarlógini fyri at endurreisa kappingarstøðuna, soleiðis sum hon var undan yvirtøkuni. Hetta stóð í upprunaliga tilmælinum sum varð sent í hoyring hjá P/f Wenzel tann 7. august 2026.

292. P/f Wenzel bað tann 10. august 2026 um longda freist á 20 yrkadagar, sbrt. §18, stk. 4 í kappingarlógini. Tann 8. september vendi P/f Wenzel sær til Kappingareftirlitið við eini umbøn um longda freist á 20 yrkadagar, sbrt. §18, stk. 3 í kappingarlógini, tí P/f Wenzel ynskti at koma við eini tilsøgn sum kundi loysa tey kappingarligu ivamálini sum vóru í málinum.

293. Tann 15. oktober 2026, dagin undan Kappingarráðsfundinum, varð endalig tilsøgn send Kappingareftirlitinum, sum á nøktandi hátt gekk teimum ivamálunum á møti, sum vóru í tilmælinum sum varð sent til Wenzel tann 7. august 2026. Vísandi til hetta var tilmælið um at geva boð sambært §21 tikið aftur av Kappingareftirlitinum.

294. Mælt verður tí Kappingarráðnum, at góðkenna yvirtøkuna hjá P/f Wenzel av ognunum hjá Sp/f Komfortbilum, við tilsøgnini frá P/f Wenzel sum treyt fyri góðkenningini av yvirtøkuni, sbrt. § 19, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 1, sbrt. § 15, stk. 2, 1. pkt.

Vegna

Kappingarráðið

Mourits Joensen
Formaður

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri